12. DESEMBER 2023

ÁLIT
UM BETRI SAMSKIPAN INNAN ENDUR-VENJING

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Kommunufelagið

INNIHALD

1. Inngangur ... 3

2. Hugtøk ... 6

3. Arbeiðið við at menna endurvenjingarøkið í Føroyum ... 9

4. Endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið ... 13
4.1. Skipanin við endurvenjingarætlan ... 14
4.1.2. Endurvenjingarætlan við útskrivan ... 14
4.2. Samskipanin innan Sjúkrahúsverkið ... 15
4.2.1. Yvirskipað samskipan ... 15
4.2.2. Samskipan til einstaka sjúklingin ... 15
4.3. Samskipan av endurvenjingini mótvegis Almannaverki og kommunum ... 17
4.3.1. Samskipan í praksis ... 17
4.3.2. Mannagongd við útskrivan ... 18
4.3.3. Tíð frá boðum um útskrivan til nýtt tilboð ... 20

5. Endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið ... 21
5.1. Rætturin til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið ... 22
5.2. Skipanin við endurvenjingarætlan ... 23
5.3. Skipanin við samskipara ... 24

6. Endur- og viðlíkahaldsvenjing í kommununum ... 25

7. Avbjóðingar innan endurvenjing ... 28
7.1 Avbjóðingar sambært Sjúkrahúsverkinum ... 29
7.2 Avbjóðingar sambært Almannaverkinum ... 31
7.3 Avbjóðingar sambært kommununum ... 35
7.4 Avbjóðingar sambært Krabbameinsfelagnum, MEGD og Landsfelag Pensjónista ... 38

8. Møguligar loysnir á verandi avbjóðingum ... 41
8.1. Nýggj lóggáva ella broytingar í lógarverkinum ... 42
8.2. Íverksetan av verandi lóggávu v.m. ... 46
8.3. Avbjóðingar við endurvenjingarætlan ... 49
8.4. Avbjóðingar við samskipan ... 52
8.5. Borgarar, ið detta niður ímillum skipanirnar ... 54
8.6. Manglandi flutningstænasta ... 56
8.7. Starvsfólkatrot ... 58

9. Játtan til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing ... 59
9.1. Játtan til endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið ... 60
9.2. Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið ... 61
9.3. Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing á kommunala økinum ... 62

10. Tilmælir ... 63

Fylgiskjal 1 ... 68

1. INNGANGUR

1

- Arbeiðssetningur og nágreinan av arbeiðssetningi
- Í arbeiðsbólkinum hava verið
- Skipan av arbeiðinum

Í apríl 2022 varð arbeiðsbólkur settur við umboðum úr Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum (tá Almannamálaráðnum) og Kommunufelagnum, at kanna hvørjar avbjóðingar eru á rehabiliteringsøkinum og hvussu hesar sum best kunnu loysast.

Eftir løgtingsvalið 8. desember 2022, hevur Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum gjørt av, at arbeiðsbólkurin skal halda fram við sínum arbeiði. Tó varð arbeiðssetningurin broyttur nakað, soleiðis at arbeiðsbólkurin skal lýsa avbjóðingarnar innan endurvenjing í Føroyum.

Í arbeiðinum hevur arbeiðsbólkurin tikið støðið í tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016, eftirmetingini av endurvenjingini frá 2020 og hevur kanna, hvørt tilmælini eru fylgd og hvørt avbjóðingarnar eru loystar.

Arbeiðssetningur og nágreinan av arbeiðssetningi

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum var hesin:

- Lýsa hvørjar avbjóðingar eru innan endurvenjing í Føroyum í dag
- Hvussu virkar skipanin við endurvenjingarætlan og samskipan í praksis – hvørjar avbjóðingar eru hesum viðvíkjandi
- Lýsa, hví ávísir sjúklingar detta niðurímillum skipanirnar í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum og nær hetta hendir
- Lýsa omanfyrinevndu avbjóðingar í hagtølum, um gjørligt
- Gera tilmæli til landsstýriskvinnuna um, hvørt avbjóðingarnar innan endurvenjing kunnu loysast við lóggávu ella á annan hátt.

Í arbeiðsbólkinum hava verið:

- *Birita Ludvíksdóttir,* forkvinna í bólkinum og løgfrøðiligur ráðgevi, Heilsumálaráðið
- R*annvá Bjarkadóttir Mohr,* samskipari í bólkinum og fulltrúi, Heilsumálaráðið
- B*arbara Álvsdóttir Thomsen,* fulltrúi, Almanna- og mentamálaráðið
- *Ann Kristina Svabo Simonsen,* fulltrúi, Almanna- og mentamálaráðið
- *Janus Haraldsen,* løgfrøðiligur ráðgevi, Kommunufelagið

Arbeiðssetningurin er at lýsa avbjóðingar innan endurvenjing í Føroyum í dag. Hetta av tí, at politiskt ynski hevur verið um at eftirmeta tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016. Viðlíkahaldsvenjing var ikki partur av tilmælinum frá 2016, av tí, at reglur ikki vóru ásettar í lóg um viðlíkahaldsvenjing fyrr enn í 2020. Hetta var gjørt við løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. Av tí, at endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing hanga neyvt saman og ásetingar nú eru í lóg um viðlíkahaldsvenjing, hevur arbeiðsbólkurin valt eisini at lýsa, hvørjar avbjóðingar eru innan viðlíkahaldsvenjing í dag.

Av tí, at hetta arbeiðið er ein eftirmeting av tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016, hevur arbeiðsbólkurin ikki viðgjørt tørvin á endurmenningartilboðum ella sálarfrøðiligum tilboðum í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin hevur lýst, hvørjar avbjóðingar eru við samskipan av endurvenjingini millum Sjúkrahúsverk, Almannaverk og kommunur. Harumframt hevur arbeiðsbólkurin, sum omanfyrinevnt, tikið viðlíkahaldsvenjing við í arbeiðið. Hvør tørvur er á sálarfrøðiligum tilboðum, herundir endur- og viðlíkahaldsvenjingartilboðum ella sálarfrøðiligum venjingardepli, er eitt stórt og viðkomandi mál í føroyska samfelagnum í dag. Arbeiðsbólkurin metir, at hetta er eitt ov stórt mál at lýsa í hesum áliti. Tað málið eigur at lýsast í einum áliti fyri seg.

Skipan av arbeiðinum

Í arbeiðinum hevur arbeiðsbólkurin innsavnað tilfar frá Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum. Tilfarið lýsir, hvussu skipanirnar virka í dag og hvørjar avbjóðingar stovnarnir síggja innan endur- og viðlíkahaldsvenjingina. Viðvíkjandi sjúkrahúsøkinum tekur arbeiðið støðið í § 6 a í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum, við tilhoyrandi kunngerð um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið. Viðvíkjandi almannaøkinum tekur arbeiðið støðið í ásetingunum í §§ 37 og 38 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, við seinni broytingum, ið snýr seg um endur- og viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi borgarar, við tilhoyrandi kunngerð um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið. Á eldraøkinum eru líknandi ásetingar í §§ 10 a og 10 b í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., við seinni broytingum.

Álitið er gjørt í tøttum samstarvi við fakfólk á økinum. Arbeiðsbólkurin hevur valt at spyrja fakfólkini á økinum, hvussu skipanin á teirra øki virkar í dag og hvørjar avbjóðingar tey síggja. Harumframt eru tey spurd um hvørt tey meta, at lóggávan er nøktandi ella treingir til ábøtur. Í kapitlunum 4, 5 og 6 er tað sostatt fakfólkini á hvørjum øki sær, sum í stóran mun hava skrivað tilfarið.

Hesi fakfólk hava luttikið í arbeiðinum: Álvur Hansen, deildarleiðari á Ergo- og fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum, Benadicta Ellingsgaard, deildarleiðari á terapideildini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Sára Olsen, deildarleiðari á fysiurgisku deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Hallur Thomsen, viðskiftastjóri í Almannaverkinum, Guðrið Jensen, leiðari á deildini Venjing í Almannaverkinum, og netverkið undir Kommunufelagnum fyri leiðarar á eldraøkinum.

Fyri at fáa innlit í hvørjar avbjóðingar borgarar uppliva innan endur- og viðlíkahaldsvenjingina í dag, hevur arbeiðsbólkurin havt fundir við - og sent skrivligar spurningar til - MEGD, Landsfelag Pensjónista og Krabbameinsfelagið. Á fundinum við MEGD luttóku harumframt umboð fyri Heilafelagið, ADHD-felagið, Hjartafelagið, Sinnisbata, Giktafelagið og CP-Føroyar.

2

- Endurvenjing
- Serkøn og almenn endurvenjing
- Viðlíkahaldsvenjing
- Endurmenning

Lýsingin av niðanfyristandandi hugtøkum er frá: *Tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016*. Mett verður, at tað er týdningarmikið hjá lesaranum at skilja, hvat liggur í ymsu hugtøkunum. Tí vera hugtøkini endurtikin í hesum áliti.

Endurvenjing

Endurvenjing er at skilja sum málrættað venjing, sum hevur til endamáls, at sjúklingurin heilt ella partvíst skal endurvinna mistan førleika. Hetta kann gera seg galdandi bæði við sjúku og skaða. Tá ið ein persónur hevur varandi sjúku, kann hann til tíðir hava tørv á einum "lyfti", fyri at endurvinna mistan førleika og sjúklingur, ið hevur verið úti fyri skaða, kann somuleiðis hava tørv á at fáa endurvenjing, soleiðis at hann endurvinnur mistan førleika. Endurvenjing er ein málrættað samstarvstilgongd millum persónin, avvarðandi og starvsfólk.

Talan er bæði um likamligar, sálarligar og kognitivar førleikar, og harvið er tørvurin á endurvenjingum ymiskur og fjøltáttaður. Tað liggur eisini í hugtakinum, at talan er um eina tilgongd, sum er tíðaravmarkað, tí endurvenjingin steðgar, tá endurvenjingin er liðug. Tað er, tá ið førleikin er endurvunnin, ella tá staðfest er, at førleikin ikki kann endurvinnast meira.

Serkøn og almenn endurvenjing

Endurvenjing verður býtt sundur í serkøna og almenna endurvenjing. Hetta eru hugtøk, ið javnan verða nýtt innan heilsuverkið. Talan er um serkøna endurvenjing, tá sjúklinginum tørvar hjálp frá løggildum heilsustarvsfólki í sjúkrahúsgeiranum við serkunnleika til ávísa sjúku, tá tørvur er á tvørfakligum samstarvi, og tá ið virkisførið hjá sjúklinginum er torgreitt, umfatandi, álvarsamt og/ella sjáldsamt og av týdningi fyri fleiri lívsøkir. Talan er um almenna endurvenjing, tá persónurin tørvar hjálp frá løggildum heilsustarvsfólki við almennum førleikum, og tá ið virkisførið hjá viðkomandi er avmarkað, uttan komplikatiónir og er einfalt at bøta um.

Viðlíkahaldsvenjing

Hugtakið endurvenjing fevnir ikki um viðlíkahaldsvenjing ella fyribyrgjandi venjingar. Viðlíkahaldsvenjing er at skilja sum málrættað venjing, fyri at forða fyri førleikamissi, og fyri at fasthalda ella betra um verandi førleika. Viðlíkahaldsvenjing fevnir bæði um likamligar og sálarligar førleikar og hegni. Við fyribyrgjandi venjingar er at skilja sum regluligar kropsligar venjingar, ið hava til endamáls at fyribyrgja sjúku og kropsligan førleika.

Endurmenning

Ofta verður endurvenjing fatað sum endurmenning og umvent. Endurmenning skal síggjast sum ein tilgongd og fevnir um meira enn endurvenjing. Sambært yvirlýsing frá WHO skal endurmenning skiljast sum ein málrættað og tíðaravmarkað tilgongd av samskipaðum veitingum og tilboðum, sum hava til endamáls at geva borgaranum neyðug amboð at megna egið lív so sjálvstøðugt sum gjørligt og við so lítlari hjálp sum gjørligt. Ein endurmenningartilgongd kann fevna um fleiri ymiskar tænastur frá einum ella fleiri myndugleikum, sum skulu málrættast í eina tíðaravmarkaða tilgongd. Endurvenjing kann verða ein liður í eini endurmenningartilgongd, men nýtist ikki at verða tað.

3. ARBEIÐIÐ VIÐ AT MENNA ENDURVENJINGARØKIÐ Í FØROYUM



3

- Tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016
- Víðari arbeiðið við endurvenjingini
- Uppskot til samtyktar 2018

Seinastu árini hevur nógv arbeiði verið gjørt fyri at betra um rættin til endurvenjing í Føroyum. Í 2015 vórðu tvey lógaruppskot um rætt til endurvenjing samtykt í Løgtinginum. Eitt lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, ið áleggur sjúkrahúsverkinum skyldu til at veita borgarum ókeypis endurvenjing, tá lækni hevur staðfest, at tørvur er á tí, fyri at borgarar kunnu varðveita eina so góða heilsustøðu sum til ber. Hitt lógaruppskotið var ein broyting í táverandi forsorgarlóg (nú løgtingslóg um almannatrygd og tænastur), ið ásetir rætt til endurvenjing innan Almannaverkið. Lógarbroytingarnar komu í gildi ávikavist 1. juni 2015 og 1. september 2015.

Tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016

Í juni 2016 lótu Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið og Kommunufelagið úr hondum tilmæli um samskipaða endurvenjing. Í hesum arbeiði vóru fleiri tilmæli um batar í skipanini. Arbeiðsbólkurin hevur tikið útgangsstøðið í hesum tilmælum.

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing, 2016, var mælt til fylgjandi:

- Játtan mátti setast av á fíggjarlógini til raðfesting av endurvenjingini, soleiðis at neyðug endurvenjingartilboð kundu verða ment og sett í verk. Mett varð, at játtanin til endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið skuldi hækkað 8,5 mió. kr. og játtanin til Almannaverkið skuldi hækkað 3,6 mió. kr. Mett varð eisini, at játtan skuldi setast av í kommunala geiranum til endurvenjing, hóast krónuupphædd ikki var sett á hetta.

- Ábyrgdarbýtið millum heilsuverk, almannaverk og kommunur skuldi gerast greiðari í lóggávu og samstarvið og samskiftið millum ymsu geirarnar, skuldi styrkjast við endurvenjingarætlan og samskipan. Arbeiðsbólkurin mælti til, at ásetingar um endurvenjingarætlan og samskipara vórðu ásettar í kunngerð við heimild í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið og forsorgarlógini.

- Arbeiðsbólkurin mælti til, at tær avtalur, ið longu eru gjørdar millum geirarnar og innanhýsis í geirunum, fáast at virka í praksis. Hetta kann gerast við, at leiðslur og starvsfólk fáa neyva kunning um og møguliga undirvísing í endamáli og innihaldi í avtalunum.

- Tilboðini hjá landinum, skuldu verða landsfevnandi, og tilboðini hjá kommunum skuldu vera atkomulig hjá borgarum í kommununum. Fyri at tryggja, at borgarin og heilsustarvsfólk eru nóg væl kunnaði um, hvørji tilboð eru innan endurvenjing kring landið, varð mælt til, at ein faldari varð gjørdur um, hvørjar veitingar innan endurvenjing vórðu veittar í sjúkrahúsverkinum, almannaverkinum og í kommunala geiranum.

- Serkøn endurvenjing skuldi verða veitt á sjúkrahúsunum, ímeðan almenn endurvenjing skuldi verða veitt á sjúkrahúsum, í almannaverkinum og í kommunala geiranum.

Víðari arbeiðið við endurvenjingini

Í árunum aftaná, at tilmælið um samskipaða endurvenjing varð handað táverandi landsstýriskvinnum og Kommunufelagnum, varð arbeitt við at íverkseta tilmælini. Tilmælið um hægri játtan til økið er tikið til eftirtektar við tað, at játtan til endurvenjing er høgt raðfest tey seinastu árini, bæði innan Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur.

Tilmælið um greiðari ábyrgdarbýtið millum heilsuverk, almannaverk og kommunur er tikið til eftirtektar við, at kunngerðir um endurvenjing eru settar í gildi á heilsuøkinum og almannaøkinum. Í 2017 var kunngerð nr. 21/2017 um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið sett í gildi. Kunngerð var eisini sett í gildi á almannaøkinum í 2017. Í hesum kunngerðum eru ásetingar um endurvenjingarætlanir og samskipan millum myndugleikar. Kunngerðirnar nágreina, hvussu endurvenjingin innan Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið skal skipast og samskipast. Í 2020 vóru ásetingar um endurvenjing og ásetingar um viðlíkahaldsvenjing settar í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og kunngerð nr. 130/2021 um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið var sett í gildi 2021. Tó er eingin kunngerð um endurvenjing í kommunala geiranum.

Viðvíkjandi tilmælinum um, at tær verandi avtalur millum geirarnar fáast at virka í praksis, kann sigast, at avtalan um samstarv um m.a. endurvenjing millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið er endurskoðað í 20201.[1]

Harumframt kann nevnast, at Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur í 2015, skrivaðu undir eina fleirpartasamstarvsavtalu um samstarv um m.a. endurvenjing.[2] Avtalan var í fyrstu atløgu galdandi til ársenda 2015, tá ið hon eftir ætlan skuldi endurskoðast. Hetta arbeiðið bar ikki á mál.

Tilmælið um, at tilboðini hjá landinum skuldu verða landsfevnandi, er tikið til eftirtektar við tað, at ein faldari um endurvenjing varð tilevnaður og givin út í 2017. Faldarin varð endurskoðaður og givin út av nýggjum í 2022. Í faldaranum verður kunnað um, hvørji endurvenjingartilboð eru innan Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar. Ætlanin við faldaranum er at lýsa, hvørji venjingartilboð eru innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur, soleiðis at borgarar kring alt landið skulu fáa møguleika til at koma til rætta endurvenjingartilboð.[3]

[1] Avtala um samstarv millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið frá 2020, sí fylgiskjal 1

[2] Avtala um fleirpartasamstarv millum Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunalu samstørvini innan eldrarøkt og Tórshavnar Kommuna: ***Fleirpartaavtala***

[3] Faldarin er tøkur á heimasíðuni hjá Heilusmálaráðnum, undir hesi leinkju: ***Faldari_venjing***

Uppskot til samtyktar 2018

Í 2018 samtykti Løgtingið eitt uppskot til samtyktar, har heitt varð á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið menningarætlan við greiðari visjón og ítøkiligum málum um samskipaða tvørfakliga endurmenning fyri Føroyar, umframt at leggja fyri Løgtingið endurmenningarlóg, sum tryggjar rættindi og skyldur hjá borgarunum (løgtingsmál nr. 79/2018). Umframt hetta var endurmenningarlóg ein partur av samgonguskjalinum í 2019 millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Miðflokkin.

Tað var sum partur av hesum uppskotið til samtyktar, at fyrrverandi landsstýrismaður í heilsumálum setti hendan arbeiðsbólk at kanna, hvørjar avbjóðingar vóru á rehabiliteringsøkinum og hvussu hesar best kunnu loysast.

Tá ið Margit Stórá, landsstýriskvinna, kom til, gjørdi hon av, at arbeiðsbólkurin skuldi halda fram við sínum arbeiði. Tó varð arbeiðssetningurin broyttur nakað, soleiðis at arbeiðsbólkurin skal lýsa avbjóðingarnar innan endurvenjing í Føroyum.

Arbeiðssetningurin er at lýsa avbjóðingar innan endurvenjing í Føroyum í dag. Hetta av tí, at politiskt ynski hevur verið um at eftirmeta tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016. Av tí, at endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing hanga saman og ásetingar nú eru í lóg um viðlíkahaldsvenjing, hevur arbeiðsbólkurin valt eisini at lýsa, hvørjar avbjóðingar eru innan viðlíkahaldsvenjing í dag.

4. ENDURVENJING INNAN SJÚKRAHÚSVERKIÐ

4

- Skipanin við endurvenjingarætlan
- Samskipanin innan Sjúkrahúsverkið
- Samskipan av endurvenjingini mótvegis Almannaverki og kommunum

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Sjúkrahúsverkið veitir endurvenjing vísandi til § 6a í løgtingslóg um Sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum. Nærri reglur eru ásettar í kunngerð nr. 21 frá 21. mars 2017 um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið.

4.1. Skipanin við endurvenjingarætlan

Sambært kunngerð nr. 17/2017 skal Sjúkrahúsverkið bjóða sjúklinginum eina endurvenjingarætlan, tá ið endurvenjing verður veitt á sjúkrahúsi. Sjúklingurin skal í seinasta lagi við útskrivan av sjúkrahúsi, ella tá ið ambulanta endurvenjingin er endað, fáa endurvenjingarætlanina.

Sjúkrahúsverkið upplýsir, at skipanin við endurvenjingarætlan er komin í gongd. Allir sjúklingar, ið eru innlagdir á seingjadeild og verða mettir at hava tørv á framhaldandi endurvenjing og verða útskrivaðir ella sendir til víðari endurvenjing, fáa endurvenjingarætlan, tá ið teir verða útskrivaðir. Hetta er galdandi fyri øll 3 sjúkrahúsini. Tey, ið møta til ambulanta viðgerð á sjúkrahúsunum, koma ikki altíð í samband við ergo- og fysioterapiina, og fáa tí ikki altíð endurvenjingarætlan.

Miðað verður ímóti, at øll ið hava tørv á endurvenjingarætlan fáa hesa. Endurvenjingarætlanirnar kunnu verða ymiskar. Ein fullfíggja endurvenjingarætlan, er ein ætlan, sum er gjørd í endurvenjingarfrymlinum í COSMIC[4]. Hetta verður gjørt til øll tey innløgdu, sum hava tørv á eini endurvenjingarætlan og teir ambulantu sjúklingarnar, sum eru í eini rehabiliteringstilgongd. Tey, sum koma inn á sjúkrahúsið ambulant, einaferð ella á skaðastovuna, fáa, um tey megna tað, ein faldara, undirvísing ella munnliga vegleiðing um endurvenjing. Hetta verður brúkt sum endurvenjingarætlan. Verður tað so, at øll sum koma inn á sjúkrahúsini skulu hava fullfíggjaða endurvenjingarætlan, verður avmarkaða starvsfólkatilfeingið og harvið játtanin brúkt minni skilagott.

4.1.2. Endurvenjingarætlan við útskrivan

Heilsumálaráðið hevur spurt Sjúkrahúsverkið, hvussu nógv av teimum, ið verða ávíst til víðari endurvenjing, hava endurvenjingarætlan við sær frá Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið hevur upplýst, at øll tey, sum hava verið innløgd og verða mett at hava tørv á framhaldandi endurvenjing, og sum skulu víðari til annað venjingarstað, ella sum skulu venja sjálvi, fáa endurvenjingarætlan. Tey, sum verða útskrivað til eitt sambýli ella annan stovn, fáa við sær eina endurvenjingarætlan. Vanlig mannagongd er, at sjúklingurin fær eina ætlan við sær. Endurvenjingarætlanin verður antin send umvegis COSMIC ella til viðkomandi stovn við telduposti. Viðhvørt fær sjúklingurin sjálvur ætlanina við sær í pappírform.

Tað er ymiskt, hvussu nógvir av teimum sjúklingum, sum ikki eru innlagdir, fáa endurvenjingarætlan. Í onkrum føri verður givin faldari ella vegleiðing í mun til, hvussu sjúklingurin skal fyrihalda seg frameftir.

[4] COMSIC er talgilda heilsuskipanin í Føroyum, har øll journalskriving fer fram.

Í mun til sjúklingar, sum verða útskrivaðir til Almannaverkið, er føst mannagongd viðvíkjandi endurvenjingarætlan. Her vísa vit til samstarvsavtaluna millum partarnar, har Almannaverkið biður um neyvari upplýsingar.[5]

4.2. Samskipanin innan Sjúkrahúsverkið

4.2.1. Yvirskipað samskipan

Tey seinastu árini hevur Sjúkrahúsverkið lagt stóra orku í at samskifta uppá tvørs av sjúkrahúsunum í sambandi við endurvenjingina. Yvirskipað hava læknastjórin og varastjórin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fingið samskipandi leiklutin viðvíkjandi samlaðu endurvenjingini innan Sjúkrahúsverkið.

Á Landssjúkrahúsinum liggur Ergo- og fysioterapideildin undir Medisinska depli. Deildarleiðararnir á Ergo- og fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum, Terapideildini fyri ergoterapi og fysioterapi á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Fysiurgisku deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi samstarva um endurvenjingina uppá tvørs av teimum trimum sjúkrahúsunum.

Í summum førum er avgerð tikin um, hvat sjúkrahús skal bjóða ávíst endurvenjingartilboð, men enn manglar í fleiri førum at taka støðu til, hvørji endurvenjingartilboð skulu veitast hvar.

4.2.2. Samskipan til einstaka sjúklingin

Sambært kunngerð nr. 21/2017 um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, skal sjúkrahúsverkið tilnevna eitt heilsustarvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa endurvenjingartilboðið til einstaka sjúklingin, m.a. skipa fyri innskrivingar- og útskrivingarsamrøðum og samstarva við Almannaverkið um framhaldandi endurvenjing.

Niðanfyri er lýsing av, hvussu endurvenjingin verður samskipað á teimum trimum sjúkrahúsunum.

Landssjúkrahúsið

Á Landssjúkrahúsinum er tað vanliga tann sjúkrarøktarfrøðingurin, ið fylgir sjúklinginum mest, ella tað heilsustarvsfólkið, sum er mest um sjúklingin, ið savnar inn upplýsingarnar til framhaldandi endurvenjing hjá Almannaverkinum ella kommununum. Hetta er ikki skipað soleiðis, at sjúklingurin verður kunnaður um, at hann hevur ein persónligan samskipara knýttan at sær. Tað er trupult at fáa eina skipan við føstum samskipara at virka í Sjúkrahúsverkinum, av tí, at heilsustarvsfólk arbeiða í skiftandi vaktum og sostatt eru fleiri heilsustarvsfólk um ein sjúkling.

Tá ið talan er um longri innleggingar, t.d. á B7, er sjúklingagongdin skipað við innleggingar-, ávegis- og útskrivingarsamrøðum. Í sambandi við aðrar innleggingar, t.d. á B8, B6 og G4 verður skipað fyri samrøðum, tá ið sjúklingurin hevur tørv á endurvenjing. Tilboðini um endurvenjing verða tillaga eftir, hvørja sjúku sjúklingarnir hava. Landssjúkrahúsið hevur gjørt avmarkingar við bert at

[5] Avtala um samstarv millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið frá 2020, sí fylgiskjal 1

lata ávísum sjúklingabólkum ambulanta endurvenjing. Hetta kann verða víðkað til aðrar bólkar, so hvørt sum játtanin til endamálið økist. Sjúklingar, ið verða innlagdir akutt, og bert liggja inni nakrar fáar dagar, koma tí vanliga ikki undir hesa skipan. Landssjúkrahúsið hevur fysioterapeutar á øllum deildum, men ikki ergoterapeutar.

Klaksvíkar Sjúkrahús

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru sjúklingar í styttri ella longri tíðarskeið innløgd til rehabilitering/endurvenjing. Rehabiliteringin/endurvenjingin er skipað við, at øll starvsfólk hava fingið undirvísing í rehabilitering, eins og tey arbeiða í rehabiliteringstoymum. Tey hava innleggingarsamrøðu, har ein luttekur fyri seingjadeild og ein fyri fysiurgisku deild. Hetta tryggjar, at eitt heilsustarvsfólk altíð er til arbeiðis, ið er um sjúklingin. Um neyðugt verða kontaktpersónar innkallaðir til serligar samrøður.

Innleggingarnar eru tíðaravmarkaðar. Tey sum t.d. hava heilaskaða og eru innløgd upp til tríggjar mánaðir, koma til venjing tvær ferðir um dagin. Tað ber eisini til at venja á seingjadeildini. Vanliga er ein innleggingarsamrøða, konferensa er mikudag, miðvegissamrøða og útskrivingarsamrøða. Um Almannaverkið ella kommunan eru partur av endurvenjingarætlanini, ella skulu taka ímóti sjúklinginum, tá ið hann verður útskrivaður, eru umboð fyri Almannaverkið ella kommunur vanliga við til innskrivingarsamrøðuna og útskrivingarsamrøðuna. Dentur verður lagdur á at hava visitator frá viðkomandi geira við til útskrivingarsamrøðuna, tá ið tørvur er á tí. Hetta er í mun til, hvat skal henda eftir útskrivan av sjúkrahúsi.

Til teir minni tungu sjúklingarnar, kann endurvenjingarætlanin verða góð kunning, t.d. við einum faldara, har víst verður á góðar framhaldandi venjingar, ið sjúklingurin skal gera eftir útskrivan. Tað verður fört inn í COSMIC hvør venjing e.l. er tilmæld.

Suðuroyar Sjúkrahús

Deildarleiðarin á Fysiurgisku deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi skipar fyri inn- og útskrivingarsamrøðum, umframt at hann eisini fylgir við í endurvenjingartilgongdini. Á Suðuroyar Sjúkrahúsi er faklig konferansa týsdag, við atliti at teimum sjúklingum, ið koma í endurvenjing.

Í mun til sjúklingar, ið skulu hava framhaldandi endurvenjing eftir útskrivan, verða Almannaverk og kommunur kunnaði so skjótt, sum tað ber til.

Samanumtikið

Sjúkrahúsverkið metir, at fyrisitingarligi parturin við at samskipa endurvenjingartilboð til sjúklingin virkar innan Sjúkrahúsverkið. Sjúklingar, ið eru innlagdir í longri tíðarskeið fáa samskipara, ið samskipar teirra endurvenjingartilboð innan Sjúkrahúsverkið, sambært kunngerðini um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið. Tá ið talan er um styttri innleggingar, er ikki altíð brúk fyri samskipan av endurvenjingini, og tá verður mett um, hvørjir sjúklingar koma at hava brúk fyri framhaldandi venjing.

4.3. Samskipan av endurvenjingini mótvegis Almannaverki og kommunum

Sambært § 4, stk. 3 og 4 í kunngerð nr. 21/2017 um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, skal sjúkrahúsverkið samstarva við Almannaverk ella kommunur um framhaldandi endurvenjing, um lækni metir, at sjúklinginum tørvar endurvenjing eftir útskrivan. Somuleiðis skal sjúkrahúsverkið samstarva við hesar myndugleikar, um lækni metir, at sjúklingur, sum fær endurvenjing frá Almannaverki ella kommunu, hevur tørv á endurvenjing frá sjúkrahúsi. Sambært § 7, stk. 2 í kunngerðini skal endurvenjingarætlan, við samtykki frá sjúklinginum, latast avvarðandi kommunu, Almannaverki ella øðrum sjúkrahúsi, um endurvenjing skal halda fram har.

4.3.1. Samskipan í praksis

Niðanfyri er lýsing av, hvussu Sjúkrahúsverkið metir at samskipan av endurvenjing mótvegis Almannaverki og kommunum virkar í praksis.

Sjúkrahúsverkið gjørdi í 2020 nýggja avtalu við Almannaverkið um útskrivan av sjúklingum. Í hesari avtalu eru eisini ásetingar um framhaldandi endurvenjing innan Almannaverkið. Avtalan er at finna á heimasíðuni hjá Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið upplýsir, at tey ígjøgnum fleiri ár, hava upparbeitt eitt vælvirkandi samstarv við Almannaverkið. Ongar avbjóðingar eru við fyrisitingarliga partinum.

Sambært Sjúkrahúsverkinum hevur tað verið ein avbjóðing, at Almannaverkið tíðum ikki hevur havt pláss tøk, tá ið sjúklingar eru klárir at skrivað út av sjúkrahúsi. Hesin trupulleiki verður tó mettur at vera loystur, við tað at Skálagarður í Klaksvík læt upp fyrr í ár og Heimið við Sílá í Suðuroy letur upp í desember í ár.

Sjúkrahúsverkið og kommunurnar hava gjørt avtalu um eina royndarverkætlan, har nøkur av eldrasamstørvinum hava fingið avmarkaða atgongd til COSMIC.

Eldrasamstørvini, ið eru partur av royndarverkætlanini eru: Norðoya Bú- og Heimatænasta, Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavn, Roðin, Vesturvón og Bú- og Heimatænastan í Suðuroy.

Royndarverkætlanin inniber at eldrasamstørvini síggja útskrivingarsamrøðurnar, sum eru skrivaðar inni á sjúkrahúsunum, eins og tey síggja blóðroyndir, medisinlistar og endurvenjingarætlanina frá fysioterapeutum og ergoterapeutum. Ætlanin er, at royndarverkætlanin skal rullast út til øll eldrasamstørvini, tá ið THS toymið er liðugt at seta skipanina upp og Sjúkrahúsverkið saman við eldraøkinum eru komin ásamt um, hvørjar upplýsingar skulu síggjast tvørtur um geirar. Eftirfylgjandi er ætlanin, at Almannaverkið eisini skal verða partur av verkætlanini.

Landssjúkrahúsið

Landssjúkrahúsið samstarvar við Almannaverkið um sosialráðgevarar, sum koma á Landssjúkrahúsið tvær ferðir um vikuna. Klaksvíkar Sjúkrahús samskiftir við deildirnar hjá Almannaverkinum á staðnum, um tørvur er á hjálp í mun til sosialráðgeva. Á sjúkrahúsinum í Suðuroy er ein sosialráðgevi í starvi í sambandi við pínuklinikkina.

Á eindini fyri Dygd&Betran arbeiða tveir sjúklingasamskiparar, sum hyggja at sjúklingagongdum fyri at vita, hvussu hesar kunnu optimerast og samskipast betur. Ætlanin er, at sjúklingasamskipararnir skulu hjálpa til, tá talan er um kompleksar viðgerðir. Hetta fer at betra um samlaðu endurvenjingina innan Sjúkrahúsverkið.

Avbjóðingar eru sambært Sjúkrahúsverkinum í mun til endurvenjingarætlanir til borgarar, ið hoyra til Almannaverkið. Hetta kemst av at Almannaverkið sambært kunngerðini skal gera sínar egnu metingar og eina nýggja endurvenjingarætlan. Tá kann arbeiðið í Sjúkrahúsverkinum kennast sum burturspilt. Sama er galdandi í mun til endurvenjing í kommununum.

Klaksvíkar Sjúkrahús

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur gjørt skrivliga avtalu við eldraøkini Norðoya Bú- og Heimatænastu, Nánd og Roðan um mannagongd fyri útskrivan. Endurvenjingarætlan, sum greinar hvør víðari venjing skal fara fram í eldraøkinum, fylgir hesum sjúklingum. Um sjúklingur verður útskrivaður til Almannaverkið ella annað kommunalt øki, verður sama mannagongd nýtt. Tað er eitt væleydnað samstarv. Sambært Sjúkrahúsverkinum henda misskiljingar/ivamál í mun til endurvenjingarætlanir til borgarar, ið skulu víðari til Almannaverkið ella kommunur. Sjúkrahúsverkið metir, at orsøkin til hesar misskiljingar/ivamál kann verða, tí at Almannaverkið og kommunurnar gera sínar egnu metingar.

Suðuroyar sjúkrahús

Suðuroyar Sjúkrahús metir, at samstarvið við kommunurnar í Suðuroynni um sjúklingar, ið tørva endurvenjing, riggar væl. Samstarvið við Almannaverkið gongur til tíðir seint.

Samanumtikið

Samanumtikið metir Sjúkrahúsverkið, at skipanin riggar væl við samskipan av framhaldandi endurvenjingartilboðum til tey, ið verða útskrivað við eini endurvenjingarætlan til framhaldandi endurvenjing í Almannaverkinum ella hjá kommununum.

4.3.2. Mannagongd við útskrivan

Niðanfyri er lýsing av mannagongdini, tá Sjúkrahúsverkið gevur kommunum og Almannaverki boð um, at sjúklingur er á veg út av sjúkrahúsi til framhaldandi endurvenjing innan Almannaverkið ella kommunur.

Landssjúkrahúsið

Tá sjúklingur skal víðari í skipanini til endurvenjing í Almannaverkinum, verður umsókn um endurvenjing send í samráð við borgaran. Somuleiðis sendir Ergo- og fysioterapideildin eina endurvenjingarætlan til Almannaverkið. Tá borgari, ið er fólkapensjónistur, verður útskrivaður og framhaldandi hevur tørv á endurvenjing, so verður endurvenjingarætlan send til avvarðandi kommunu.

Í sambandi við útskrivan av sjúkrahúsi, er ein mannagongd fyri útskrivan av sjúklingum. Tá ein sjúklingur skal útskrivast verður visitator frá viðkomandi geira tilkallaður. Eftir hetta vitjar visitator frá viðkomandi geira eina ferð um vikuna á viðkomandi deild, fyri at leggja eina ætlan fyri einari góðari útskrivan.

Tá sjúklingur er undir fólkapensjónsaldur, setir Landssjúkrahúsið seg í samband við Almannaverkið og tá ið sjúklingur er vorðin fólkapensjónistur, setir Landssjúkrahúsið seg í samband við avvarðandi kommunu, soleiðis at ætlan kann leggjast fyri útskrivan.

Tungir sjúklingar, ið verða innlagdir á Landssjúkrahúsinum til endurvenjing, eru vanliga innlagdir á Landssjúkrahúsinum fyrstu tíðina, fyri síðani at verða fluttir á Klaksvíkar sjúkrahús til víðari endurvenjing.

Landssjúkrahúsið upplýsir, at tey ikki altíð tíðliga í tilgongdini vita, hvar í skipanini persónurin skal hava víðari endurvenjing. Móttakandi geiri fær fráboðan, tá ið avgerð er tikin um, hvar viðkomandi skal hava víðari endurvenjing eftir útskrivan av Landsjúkrahúsinum. Tað inniber, at persónurin møguliga skal hava víðari endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, antin á Klaksvíkar sjúkrahúsi ella á Suðuroyar sjúkrahúsi. Annar møguleiki er at viðkomandi skal vísast til Almannaverkið, kommunurnar ella at mett verður, at endurvenjingin er liðug.

Suðuroyar Sjúkrahús

Tá talan er um fólkapensjónistar, ið skulu útskrivast av Suðuroyar sjúkrahúsið, verður samskift við visitator hjá kommununi. Við samansettum/kompleksum sjúklingagongdum er tvørfakligur fundur við sjúkling, avvarðandi og visitator nakrar vikur áðrenn útskrivan.

Suðuroyar Sjúkrahús ger heimavitjan saman við visitatori. Eitt dømi er, at tá alt er uppá pláss (hjálpitól v.m.) verður ringt til Bú- og Heimatænastuna, uml. 3 dagar áðrenn ætlaða útskrivan, og sjúklingurin verður síðani útskrivaður. Tvs. sjúkrahúsdeildin gevur kommununum boð um útskrivan, og øll viðkomandi skjøl fylgja við, eisini endurvenjingarætlan. Við atliti at endurvenjingarætlanum samskifta fakfólkini umvegis arbeiðsteldupostar. Hetta lættir um samskiftið millum starvsfólkini. Starvsfólk hjá eitt nú Bú- og Heimatænastuni kunnu fara inn á COSMIC og síggja endurvenjingarætlanina hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi. Fysiurgiska deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi samskiftir mest við kommunur í Suðuroynni.

Somuleiðis samskifta seingjadeildin og fysiurgiska deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi við Almannaverkið, tá sjúklingur skal útskrivast. Er talan um endurvenjing frá Almannaverkinum, verður hetta avgreitt umvegis telefon, ella møtir eitt umboð frá Almannaverkinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Er talan um borgara við kompliseraðari sjúklingagongd, fær Almannaverkið boð nakrar vikur eftir innlegging. Í hesum førum hevur Almannaverkið ein kontaktpersón, sum møtir til fundir á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Klaksvíkar sjúkrahús

Mannagongdin er, at rehabiliteringstoymið setir seg í samband við rætta viðkomandi hjá kommunum ella Almannaverki, umvegis telefon ella teldupost. Klaksvíkar Sjúkrahús hevur greiðar mannagongdir bæði við Almannaverkið og eldrasamstørvini, um hvussu farast skal fram við innleggjan, miðvegis samrøðu og útskrivan.

4.3.3. Tíð frá boðum um útskrivan til nýtt tilboð

Heilsumálaráðið hevur spurt Sjúkrahúsverkið, hvussu long tíð gongur, frá at Almannaverkið ella kommunurnar, fáa boð um at ein sjúklingur er ávegis, inntil onnur skipan skal yvirtaka sjúklingin.

Sjúkrahúsverkið hevur svarað, at tey ikki hava tøl fyri, hvussu long tíð gongur frá tí at Almannaverkið og/ella kommunur fáa boð um, at sjúklingur er ávegis, til onnur skipan tekur yvir.

Sjúkrahúsverkið er av tí fatan, at kommunalu endurvenjingartilboðini eru sera ymisk og borgarin ikki altíð hevur møguleika fyri at fáa endurvenjingartilboð í kommununi, har hann býr, hóast hann hevur fingið endurvenjingarætlan heim við frá Sjúkrahúsverkinum.

Tað kann vera ymiskt, hvussu long tíð gongur til Almannaverkið og kommunurnar fáa boð.

Er talan um sjúklingar við seinheilaskaða, sum koma á Klaksvíkar Sjúkrahús eftir at hava verið í Danmark til viðgerð, er heilt greið mannagongd við Almannaverkið frá fyrsta degi. Tað við siga, at tá fráboðan kemur um, at sjúklingur fer at koma á Klaksvíkar Sjúkrahús, er altíð ein yvirleveringsfundur, har luttakarar frá Almannaverkinum eisini eru við. Hesin sjúklingabólkur er sum oftast 3 mánaðir ella meira á sjúkrahúsinum. Tað verður altíð settur ein væntaður útskrivingardagur við móttøkusamrøðuna og leypandi verður gjørd meting um útskrivingardagurin fer at halda. Hesin bólkur fevnir um 1 – 3 sjúklingar árliga.

Tá Klaksvíkar Sjúkrahús móttekur sjúklingar frá Landssjúkrahúsinum, sum hava stóran skaða ella ógvusligan førleikamiss, fer Klaksvíkar Sjúkrahús undir eina tilgongd at skipa móttøkuna á sama hátt, sum teir sjúklingar sum koma úr Danmark. Her verður hugsað um leistin, har Almannaverkið ella kommunan verður tikin við, so skjótt sum sjúklingurin er ávístur til Klaksvíkar Sjúkrahús.

Styttri útskrivingarfreist er fyri innlagdar sjúklingar, sum vera fluttir í kommunala geiran. Eldraøkini ynskja at fáa boð tveir dagar undan útskrivan. Um talan er um sjúkling við ógvusligum broytingum í førleikum, verður samskift við eldraøkini í góðari tíð. Sum oftast eru pláss ikki tøk, og sjúklingurin kann tí ikki útskrivast av sjúkrahúsinum.

5. ENDUR- OG VIÐLÍKAHALDS-VENJING INNAN ALMANNAVERKIÐ

5

- Rætturin til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið
- Skipanin við endurvenjingarætlan
- Skipan við samskipara

5.1. Rætturin til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið

Almannaverkið veitir endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, við heimild í §§ 37 og 38 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur. Nærri reglur um endur- og viðlíkahaldsvenjing eru ásettar í Kunngerð nr. 130 frá 24. august 2021 um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið.

Endurvenjing

Við heimild í § 37 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur veitir Almannaverkið endurvenjing til persónar í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum vegna mistan førleika tørva endurvenjing.

Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at persónurin:

1) kann fáa ella varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, ella
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Í serligum føri kann endurvenjing veitast til persónar, sum eru 16 og 17 ár, tá ið endurvenjingin er ein liður í arbeiðsbúgvingarætlan, sambært løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Endurvenjingin verður veitt grundað á eina fakliga meting hjá Almannaverkinum, og endar, tá ið Almannaverkið, grundað á eina fakliga meting, staðfestir, at førleikin er endurvunnin, ella at førleikin ikki kann endurvinnast.

Endurvenjingin hjá Almannaverkinum hevur verið í fullum virksemi til allar málbólkar og um alt landið síðani 2014.

Viðlíkahaldsvenjing

Við heimild í § 38 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur veitir Almannaverkið viðlíkahaldsvenjing til persónar í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum orsakað av breki ella sjúku hava ella eru í vanda fyri at fáa týðandi varandi skert virkisføri, ið munandi víkir frá aldurssvarandi virkisføri, og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni.

Endamálið við viðlíkahaldsvenjingini er at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at persónur:

1) kann fáa ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin, ella
2) klárar seg uttan hjálp, ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Viðlíkahaldsvenjing verður veitt grundað á eina fakliga meting hjá Almannaverkinum, og endar, tá ið Almannaverkið, grundað á eina fakliga meting, staðfestir, at venjingin ikki munar nakað fyri førleikan hjá borgaranum.

Almannaverkið fór undir at veita viðlíkahaldsvenjing 1. september 2021.

Politiskt er avgerð tikin um, at viðlíkahaldsvenjingin verður stig- og miðvíst útbygd yvir tey næstu 4 - 6 árini. Í løtuni er tilboðið til borgarar, sum hava parkinson, sclerosu ella seinheilaskaða. Talan er um venjing kring alt landið.

Ávísing til endur- og viðlíkahaldsvenjing

Fyri at fáa endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, skal borgarin søkja um hetta. Umsóknirnar koma frá borgaranum sjálvum. Nøkur fáa hjálp frá t.d. Sjúkrahúsverkinum at søkja og onnur søkja sjálvi uttan hjálp. Sosialráðgevar í Almannaverkinum hjálpa summum at søkja. Almannaverkið skrásetir ikki hagtøl, ið vísa um borgarin hevur fingið hjálp at søkja ella ikki, og tí er ikki gjørligt at staðfesta, hvussu nógvir borgarar eru ávístir av Sjúkrahúsverkinum.

5.2. Skipanin við endurvenjingarætlan

Í kunngerðini um endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið er ásett, at Almannaverkið skal, í samráð við borgaran, leggja eina venjingarætlan, alt eftir um talan er um endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing.

Kunngerðin ásetur, hvat venjingarætlanin í minsta lagi skal fevna um. Í mun til endurvenjing skal ásetast, nær eftirmetingar skulu verða gjørdar.

Harumframt ásetur kunngerðin, at Almannaverkið skal, sambært avtalu við persónin, lata avvarðandi kommunu ella sjúkrahúsi venjingarætlan, um venjingin skal halda fram har.

Almannaverkið upplýsir, at tey hava fastar mannagongdir hesum viðvíkjandi. Í sambandi við at venjingin byrjar, verður ein venjingarætlan gjørd fyri hvønn einstakan. Endaligar eftirmetingar eru lagdar inn sum fast tiltak í báðar tænastur, og miðskeiðis eftirmeting er løgd inn sum fast tiltak í tænastuna endurvenjing. Venjingarætlanirnar verða tillagaðar eftir tørvi í sambandi við áðurnevndu eftirmetingar.

Venjingarætlanirnar hjá Almannaverkinum byggja á endurvenjingarætlan ella annað viðkomandi tilfar frá Sjúkrahúsverkinum og/ella øðrum viðkomandi samstarvspørtum, t.d. kommunulækna, sosialráðgeva ella privatstarvandi ergo- og fysioterapeutum, eins og eygleiðingar og vitan um borgaran, sum ger tað møguligt hjá nýggjum starvsfólki at halda fast í tilgongdini hjá borgaranum, at endurvinna mistar førleikar. Eisini verður ein málsamrøða gjørd við borgaran.

Handan av endurvenjingarætlan millum geirar

Almannaverkið metir tað vera neyðugt, at endurvenjingarætlan fylgir við í sambandi við útskrivan frá sjúkrahúsi, har venjing hevur verið partur av viðgerðini. Hetta fyri at tryggja, at tænastan til borgaran byggir víðari á ta vitan, sum Sjúkrahúsverkið hevur ogna sær um støðuna hjá borgaranum.

Almannaverkið upplýsir, at endurvenjingarætlan javnan fylgir við borgarum, sum verða ávístir frá Sjúkrahúsverkinum, men ikki altíð (sí nærri útgreinan undir avbjóðingar). Samstarv verður aloftast fingið í lag, um Almannaverkið tørvar nærri lýsing av borgarunum. Oftast er talan um endurvenjingarætlan, men viðhvørt er talan um avrit av journal (notat frá kanningum hjá ergoterapeuti og fysioterapeuti, kanningarúrslit frá røntgen ella aðrari læknakanning ella útskrivingarbræv).

Sama støða er galdandi millum Almannaverkið og kommunurnar. Frágreiðing um borgaran verður í flestu førum latin samstarvspartinum, sum skal yvirtaka uppgávuna, tó ikki altíð sum ein endurvenjingarætlan. Talan kann eisini verða um eina venjingarskrá, eina frágreiðing og/ella munnliga sparring.

5.3. Skipanin við samskipara

Í kunngerðini um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið er ásett, at Almannaverkið skal tilnevna eitt starvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa venjingartilboðið:

1) Um mett verður, at persónur, ið fær endur- ella viðlíkahaldsvenjing frá Almannaverkinum, tørvar endur- ella viðlíkhaldsvenjing frá sjúkrahúsið ella kommunu, skal Almannaverkið samstarva við sjúkrahúsið ella kommunu.
2) Um mett verður, at persónur, ið fær endur- ella viðlíkahaldsvenjing frá sjúkrahúsi ella kommunu, tørvar endur- ella viðlíkahaldsvenjing frá Almannaverkinum, skal Almannaverkið samstarva við sjúkrahúsið ella kommunu.

Í Almannaverkinum er mannagongdin tann, at tá ið borgari fær endur- ella viðlíkahaldsvenjing verður ein kontaktterapeutur valdur, sum hevur evstu ábyrgd fyri at arbeitt verður eftir venjingarætlanini og at neyðugu dagføringarnar verða gjørdar. Eisini hevur kontaktterapeuturin evstu ábyrgd fyri samstarvi við aðrar partar. Kontaktterapeuturin verður skrásettur í journalskipanina.

Borgari eigur at kunnast um, hvør kontaktterapeuturin er. Borgari hevur í flestu førum fast samband við ein ergoterapeut og ein fysioterapeut í einum venjingarskeiði, og javnan er arbeiðsbýtið millum hesar javnt býtt í sambandinum við borgaran. Tí kann væntast, at borgarin ikki altíð er heilt greiður yvir, hvør av hesum er hansara kontaktterapeutur, hóast terapeutarnir og deildin Venjing, í samskipanini hava greiðu á hesum.

6. ENDUR- OG VIÐLÍKAHALDS-VENJING Í KOMMUNUNUM

6

- Venjingartilboðini í einstøku økjunum

Kommunufelagið

Sambært løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er uppgávan hjá kommununum at veita eina samskipaða heildartænastu til borgarar, ið hava tørv á hjálp, og hava rætt til veitingar sambært lógini. Vísast kann serliga til §§ 1, 10, 10 a, og 10 b í lógini.

Heildartænastan kann millum annað fevna um virksemi, sum hevur til endamáls at endurmenna mistar førleikar og stimbra møguleikarnar hjá tí einstaka at klára seg sjálvan. Tað er í høvuðsheitum eftir hesum reglum, at kommunurnar hava skipað eina røð av ymsum tilboðum innan endurvenjing og endurmenning.

Ítøkiliga fyri heimabúgvandi fólkapensjónistar veita kommunurnar endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing. Somuleiðis skipa kommunurnar fyri heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi venjing.

Endurvenjing verður veitt borgarum, sum vegna mistan førleika kunnu hava tørv á hesum fyri at búgva longri í egnum heimi og í heila tikið fyri, at borgarin kann gerast meiri sjálvhjálpin. Talan er sostatt um venjing, ið skal byggja upp aftur mistar førleikar.

Viðlíkahaldsvenjing er markað borgarum, sum vegna ellisbrek ella sjúku hava týðandi og varandi skert virkisføri. Hendan venjing hevur sostatt sum endamál at varðveita verandi førleikar og fyribyrgja at virkisførleikin hjá borgaranum versnar.

Heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi venjing er eitt breitt tilboð, sum til dømis kann fevna um likamliga venjing og vegleiðing í at liva við varandi sjúku, herundir vegleiðing um nýtslu av hjálpartólum og vælferðartøkni.

Venjing í kommunum verður skipað í sjey samstarvsøkjum, umframt Tórshavnar Kommunu, sum er skipað fyri seg. Hesi økini skipa venjingartilboðini hvør í sínum lagi eftir lokala tørvinum.

Venjingartilboðini í einstøku økjunum verða javnan dagførd og vóru í juni 2022 savnaði í felags yvirliti í faldaranum "Endurvenjing og venjing – Tilboð um endurvenjing og venjing frá Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum":

NORÐOYA BÚ- OG HEIMATÆNASTA

NORÐOYA BÚ- OG HEIMATÆNASTA:

- Skipað venjing í Ven og Virka í Klaksvík
- Skipað venjing í Ven og Virka á Viðareiði
- Eginvenjing í Ven og Virka í Klaksvík
- Eginvenjing í Ven og Virka á Viðareiði
- Søkjast kann um serflutning til venjingartilboðini í Klaksvík
- Samdøgursrehabilitering á Sambýlinum á Heygnum
- Venjing sum kvøldskúlatilboð 60+ www.kks.fo

NÁND:
- Skipaðar endur- og viðlíkahaldsvenjingar
- Møguligur serflutningur til skipaðu venjingarnar
- Eginvenjing í Miðstøðini í Leirvík fyri borgarar 60+
- Eginvenjing í kappróðrarfelagnum í Fuglafirði

ROÐIN:
- Samdøgursrehabilitering á Eysturoyar Røktar¬ og Ellisheimi í Runavík
- Heilsufremjandi venjing í Bylgjuni í Runavík
- Heilsufremjandi venjing í Ítrottarhøllini á Skála

VEKS:
- Fyribyrgjandi venjing á Heiminum á Grønanesi í Vestmanna
- Fyribyrgjandi venjing á Mørkini í Streymnesi
- Fyribyrgjandi venjing í Hólmahúsinum á Eiði
- Fyribyrgjandi venjing í fimleikahøllini í skúlanum í Kvívík

HEILSU- OG UMSORGANARTÆNASTAN:
- Samdøgursrehabilitering á Urd í Hoyvík
- Fyribyrgjandi venjing í FIMI í Gundadali
- Fyribyrgjandi venjing í Badmintonhøllini í Gundadali
- Fyribyrgjandi venjing í fimleikahøllini í Kollafirði
- Fyribyrgjandi venjing í Nólsoy
- Eginvenjing í venjingarmiðstøð
- Venjing í bólki og sjálvvenjing í Tilhaldinum í Miðbýnum
- Venjing til borgarar í dagtilboðunum í Tórshavnar Kommunu

VESTURVÓN:
- Venjing í sambandi við rehabilitering/umlætting á Sýnini
- Venjing til borgarar á Dagtilboðnum í Ivanshúsi
- Heilsufremjandi venjing í venjingarhølinum á Sýnini

ØKISTÆNASTAN Í SANDOYAR SÝSLU:
- Heilsufremjandi venjing í Ítróttarhøllini á Meginskúlanum í Sandoynni

BÚ– OG HEIMATÆNASTAN Í SUÐUROY:
- Venjing og fimleik í vatni í Pálshøll til 60+
- Gerandisrehabilitering
- Egin venjing á Hamragarði

Venjingartilboðini í kommununum eru fyri borgarar í fólkapensjónsaldri. Tilboðini krevja ikki ávísing frá lækna.

Tilboðini verða vanliga samskipaði av fysioterapeutum og ergoterapeutum. Hesir fakbólkar stíla eisini fyri venjingunum.

Ein partur av arbeiðinum er ofta at gera eina venjingarætlan fyri borgaran. Summir borgarar hava tó endurvenjingarætlanir við sær, sum teir hava fingið frá Sjúkrahúsverkinum. Tá verður vanliga tikið útgangsstøði í hesari við atliti at støðuni hjá borgaranum og lokalu venjingartilboðini.

7. AVBJÓÐINGAR INNAN ENDURVENJING

7

- Avbjóðingar sambært Sjúkrahúsverkinum
- Avbjóðingar sambært Almannaverkinum
- Avbjóðingar sambært kommununum
- Avbjóðingar sambært Krabbameinsfelagnum, MEGD og Landsfelag Pensjónista

7.1 Avbjóðingar sambært Sjúkrahúsverkinum

Í 2021 gjørdi Heilsumálaráðið eina eftirmeting av endurvenjingini á sjúkrahúsunum, saman við teimum, ið varða av endurvenjingini á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi. Niðanfyristandandi er ein samandráttur av hesari eftirmeting. Harumframt hevur Sjúkrahúsverkið svara Heilsumálaráðnum uppá spurningar um endurvenjing í sambandi við hetta álit. Hetta tilfar er eisini tikið við í lýsingini niðanfyri.

Í arbeiðinum hevur Sjúkrahúsverkið víst á ítøkiligu avbjóðingarnar niðanfyri:

Manglandi vitan um regluverkið

Sum víst á omanfyri, er seinastu árini gjørt eitt stórt arbeiði at betra um lógarkarmarnar innan endurvenjingarøkið. Ásetingar um endurvenjing eru nú í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt. Harumframt er kunngerð um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið frá 2017, kunngerð um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið frá 2021, samstarvsavtala um endurvenjing ímillum Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið frá 2020 og faldarin um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur, sum varð útgivin í 2022.

Alt arbeiðið er gjørt fyri at betra um tænasturnar til borgaran viðvíkjandi endur- og viðlíkahaldsvenjing og fyri at betra um samskipanina ímillum geirarnar í mun til endur- og viðlíkahaldsvenjing.

Ein avbjóðing hesum viðvíkjandi er, at starvsfólk innan Sjúkrahúsverkið ikki kenna nóg væl til galdandi reglur á økinum. Hetta viðførir, at reglurnar ikki virka í praksis.

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016, varð mælt til fáa tær avtalur, ið longu vóru gjørdar millum geirarnar at virka í praksis. Mælt varð til, at hetta varð gjørt við, at leiðslur og starvsfólk fingu neyva kunning um og møguliga undirvísing í endamáli og innihaldi í avtalunum. Nógv bendir á, at hetta tilmælið ikki er íverksett.

Mett verður framvegis, at tað er neyðugt javnan at undirvísa starvsfólkum um, hvørjar reglur eru galdandi á endurvenjingarøkinum. Hetta fyri at íverkseta galdandi reglur í lóg, kunngerð og samstarvsavtalu.

Ásetingar í kunngerð um endurvenjing

Í kunngerðini um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið stendur í § 4, at Sjúkrahúsverkið tilnevnir “eitt heilsustarvsfólk” at samskipa endurvenjingartilboðið til sjúklingin.

Hetta kann vera ein avbjóðing í mun til, at tað í Sjúkrahúsverkinum er so, at starvsfólkini arbeiða í vaktum. Tað er tí neyðugt, at tað eru tvey heilsustarvsfólk ella fleiri, um at røkja uppgávuna.

Tað kundi verið umhugsað at broytt orðingina í § 4 í kunngerðini, so at Sjúkrahúsverkið tilnevnir heilsustarvsfólk at samskipa endurvenjingartilboðið til sjúklingin.

Samskipan í mun til hinar geirarnar

Sjúkrahúsverkið metir, at tað samanumtikið manglar vitanardeiling og kunning um, hvørji tilboð eru uttanfyri Sjúkrahúsverkið. Víst verður á, at tilboðini í Almannaverkinum eru tíðaravmarkaði og Sjúkrahúsverkið hevur ikki vissu fyri, at sjúklingurin fær játtað víðari endurvenjing. Tilboðini í kommununi eru sera ymisk í stødd og vavi, og kann tað vera trupult at vita, hvørji tilboð eru í einstøku kommununum. Tískil heldur endurvenjingin fram sum longst í Sjúkrahúsverkinum.

Hesar avbjóðingar kunnu loysast við íverksetan av verandi lóggávu, sum mælt verður til seinni í hesum áliti.

Avbjóðingar í Sjúkrahúsverkinum

Tá ið ein sjúklingur hevur verið til viðgerðar uttanlands, kunnu verða avbjóðingar við, at sjúklingurin verður útskrivaður av donskum sjúkrahúsi. Tað vil siga, at sjúklingurin kemur ikki í samband við Sjúkrahúsverkið, tá ið viðkomandi kemur aftur til Føroya, men fer beint í egið heim. Hesir sjúklingar kunnu sostatt detta niðurímillum og ikki fáa tað endurvenjingartilboð, sum teimum tørvar.

Hendan avbjóðing kundi verið loyst við, at sjúklingurin fekk eina uppfylgjandi samrøðu í sambandi við, at sjúklingurin kom aftur til Føroya. Í hesari samrøðu kundi verið avklára, um sjúklingurin hevði tørv á víðari endurvenjing í ávíkavist Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum ella kommununum.

Avbjóðingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Um ein sjúklingur á Suðuroyar Sjúkrahúsi hevur tørv á endurvenjing frá Almannaverkinum eftir útskrivan, keypir Almannaverkið vanliga hesa tænastu frá Suðuroyar Bú- og Heimatænastu. Suðuroyar Sjúkrahús upplivir, at tað kann vera ein avbjóðing at Almannaverkið ikki sjálvt er til staðar í oynni, og at hetta til tíðir hevur við sær, at Suðuroyar Sjúkrahús sjálvt veitir venjingartilboðið.

Ein onnur avbjóðing er at Suðuroyar Bú- og Heimatænasta hevur fingið atgongd til COSMIC, men at Bú- og Heimatænastan ikki enn sær endurvenjingarætlanirnar hjá sjúkrahúsverkinum í COSMIC. Suðuroyar Bú- og Heimatænasta sær bert útskrivingarsamrøðuna, uttan skjøl. Hetta er ein avbjóðing av tí, at Bú- og Heimatænasta ikki fær veitt sjúklinginum nøktandi endurvenjing eftir útskrivan, um hon ikki sær endurvenjingarætlanina.

Tá ið Suðuroyar Sjúkrahús hevur sjúkling við seinheilaskaða, ella sjúkling, ið tørvar taluvenjing, er ov trupult at fáa fatur á logopedinum. Hóast logopedurin er settur fyri alt sjúkrahúsverkið, er hann ikki lættur at fáa til Suðuroyar at veita viðgerð. Hetta má takast upp í Sjúkrahúsverksleiðsluni.

Flutningur

Sambært Sjúkrahúsverkinum er skipanin í dag tann, at ein sjúklingur kann fáa tilboð um ambulanta endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum, men sjúklingurin fær ikki flutning til og frá sjúkrahúsinum.

Hetta viðførir, at allir føroyingar reelt ikki fáa sama tilboð um endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum. Til dømis skal ein sjúklingur, ið býr í Vágunum, sjálvur syrgja fyri flutningi úr Vágum til t.d. Klaksvíkar fyri at fáa endurvenjing, ímeðan ein sjúklingur, ið býr í Klaksvík, ikki hevur útreiðslur av flutningi til endurvenjing.

Hetta er ein avbjóðing, sum kann viðføra, at sjúklingar í ávísum støðum í landinum, ikki taka av tilboðnum um endurvenjing, av tí, at teir ikki hava nøktandi flutning til endurvenjingarveitingina.

Endurvenjingarætlanin

Sambært galdandi kunngerð um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, skal sjúklingurin fáa eina endurvenjingarætlan frá Sjúkrahúsverkinum. Sambært kunngerð 130/2021 um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið, verður endurvenjing veitt grundað á eina fakliga meting hjá Almannaverkinum. Áðrenn endurvenjing verður veitt, skal Almannaverkið gera eina endurvenjingarætlan í samstarvi við borgaran.

Tað vil siga, at tá ið sjúklingurin skal hava endurvenjing víðari innan Almannaverkið, ger Almannaverkið nýggja meting og nýggja endurvenjingarætlan til sjúklingin. Sama er galdandi í mun til endurvenjing í kommununum.

Sjúkrahúsverkið hevur víst á, at tey meta hetta vera eina avbjóðing og hava tey eina fatan av, at hetta í summum førum kann viðføra, at tann endurvenjing, sum sjúklingur hevur fingið á sjúkrahúsinum, dettur niðurfyri, eftir at sjúklingurin verður útskrivaður av sjúkrahúsinum.

Í Danmark er skipanin tann, at Regionsrådet veitir sjúklingi endurvenjingarætlan, um sjúklingurin hevur læknafakliga grundaðan tørv á endurvenjing eftir útskrivan á sjúkrahúsi. Kommunustýrið hevur síðani skyldu til at veita sjúklingi endurvenjing sambært endurvenjingarætlanini.[6] Kommunustýrið, ið hevur ábyrgd av endurvenjingini eftir útskrivan av sjúkrahúsi, hevur ikki heimild til at víkja frá læknafakligu metingini av endurvenjingartørvinum hjá sjúklinginum. Um tað í endurvenjingarætlanini stendur, at sjúklingurin hevur tørv á almennari endurvenjing eftir útskrivan, skal kommunustýrið skjótast gjørligt meta um, hvørt sjúklingurin hevur tørv á grundleggjandi ella kompleksari endurvenjing.[7] Sjúkrahúsverkið metir, at tað kundi verið umhugsað, at gjørt líknandi skipan í Føroyum.

7.2 Avbjóðingar sambært Almannaverkinum

Í arbeiðinum hevur arbeiðsbólkurin innsavnað tilfar frá Almannaverkinum. Almannaverkið hevur víst á niðanfyristandandi ítøkiligu avbjóðingar.

Manglandi vitan um samstarvsavtaluna

Umframt lógir og kunngerðir er gjørd ein samstarvsavtala millum sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur, sum greitt orðar leistin fyri samskipan millum geirar. Hendan er nýliga dagførd. Almannaverkið upplivir tó, at samskipanin er ymisk í praksis. Hetta er tengt at tørvinum og sjúkuni hjá borgaranum, eins og tað er ymiskt frá sjúkrahúsi til sjúkrahús.

[6] § 84 og § 140 í Sundhedsloven

[7] Bekendtgørelse nr. 918/2018 om genoptræningsplaner og om patienters valg af genoptræningstilbud

Almannaverkið hevur eina fatan av, at flest allir leiðarar fyri venjingartænasturnar kring landið kenna samstarvsavtaluna, meðan aðrir samstarvspartar (ofta undir leiðsluniveau) ikki kenna avtaluna ella innihaldið í avtaluni í nøktandi mun. Í høvuðsheitum er tað Klaksvíkar Sjúkrahús og tungar apoplexiir (tey sum hava verið til uppvenjing í DK), har leisturin í samstarvsavtaluni virkar væl. Aðrar samstarvstilgongdir fyri lættari og miðal-hart rakt fólk, tola væl ábøtur.

Ymiskt frá sjúkrahúsi til sjúkrahús

Almannaverkið upplivir, at borgarar sum hava tungu apoplexiirnar, og verða fluttir millum geirar, hava eina støðuga mannagongd og veiting av endurvenjingarætlanum. Serliga verður hugsað um tey, sum hava verið í Danmark til "specialgenoptræning" og síðan hava eina uppfylgjandi innlegging á sjúkrahúsinum í Klaksvík. Í teimum førum er samskipanin so mikið góð, at onki er at viðmerkja. Tað merkist týðiliga at Klaksvíkar Sjúkrahús og Almannaverkið eru í venjing at handfara hesar samansettu útskrivingar. Í flestu førum eisini við avvarðandi kommunu. Fráboðanir koma í nóg góðari tíð og Almannaverkið er javnan bjóðað við til ávegis samrøður.

Almannaverkið vísir á, at samskipanin á Landssjúkrahúsinum ikki er eins væl skipað, sum á Klaksvíkar sjúkrahúsi, og undrast tey á, at tey so sjáldan eru boðin við á tílíkar fundir.

Almannaverkið verður vanliga ikki boðin við til tvørfakligar samstarvsfundir á Landssjúkrahúsinum í sambandi við at ein borgari skal útskrivast til víðari tilboð í Almannaverkinum, og er tað fatanin hjá Almannaverkinum, at tað er tilvildarligt nær í tilgongdini Almannaverkið er kunnað um ein møguligan tørv á venjing hjá einum borgara.

Sambært Almannaverkinum eru tað at kalla ongi dømi um fráboðanir ella umsóknir frá Suðuroyar Sjúkrahúsi um borgarar, sum hava brúk fyri venjing. Hinvegin er tað javnan at borgarar úr Suðuroynni, sum hava fingið játtað venjing frá Almannaverkinum, eisini liggja innanfyri málbólkin, sum kann fáa venjing frá Suðuroyar Sjúkrahúsi og tískil enda við at venja har, í staðin fyri hjá Almannaverkinum.

Ymisk samskipan til ymiskan tørv

Sum nevnt omanfyri upplivir Almannaverkið, at borgarar sum hava tungu apoplexiirnar og verða fluttir millum geirar, hava eina støðuga mannagongd og veiting av endurvenjingarætlanum.

Almannaverkið hevur eina fatan av, at tungar og miðaltungar apoplexiir, sum ikki fara til viðgerð og uppvenjing í Danmark, ikki verða handfarnar við somu konsekventu mannagongd í sambandi við skifti millum geirar.

Almannaverkið undrast á, at tey ikki síggja fleiri av teimum, sum eru miðal ella lætt rakt, í sambandi við apoplexi. Fatanin hjá Almannaverkinum er, at hesi hava eitt venjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum til ongin venjingartørvur er eftir og tey tí ikki leita eftir venjingartilboðum uttan fyri sjúkrahúsið. Hesin pástandur er tó ikki kannaður.

Útskriving og skifti millum geirar eftir innleggingar, har tørvurin hjá borgaranum ikki er samansettur, verður handfarið ymiskt og ikki altíð í nóg góðari tíð.

Í summum førum er talan um borgarar, sum hava fingið hjálp frá Sjúkrahúsverkinum at søkja venjing, men útskrivingin er longu farin fram, tá endurvenjingarætlanin kemur til Almannaverkið. Í hesum førum ber illa til at skipað skiftið til ergoterapeutar og fysioterapeutar, tí borgarin er farin út av sjúkrahúsinum og starvsfólkini eru víðari við øðrum uppgávum. Samskipanin og fortreytirnar fyri samstarvi, verða nógv ávirkaðar av hesum.

Í øðrum førum er talan um borgarar, sum hava haft eina innleggjan á sjúkrahúsi, men hóast tað, ikki hava fingið hjálp frá Sjúkrahúsverkinum at søkja venjing. Orsøkirnar kunnu verða ymiskar. Eitt nú kann hugsast, at førleikaskerjingin ikki hevur víst seg í tí varda umhvørvinum á eini seingjadeild, ella at metingin hevur verið, at avbjóðingin fór at laga seg av sær sjálvum, og tí ikki kravdi víðari venjing. Oftast møtir Almannaverkið hesum fólkum, tí tey sjálvi taka stig til at søkja venjing, eftir at tey hava verið útskrivað í eina tíð, og ikki meta at teirra støða hevur rætta seg nóg væl.

Almannaverkið upplivir av og á, at ergoterapiin og fysioterapiin á sama sjúkrahúsi søkja hvør sær, vegna sama borgara. Eisini er komið fyri, at ergoterapiin á sjúkrahúsinum endar sítt tilboð og søkir um venjing frá Almannaverkinum vegna borgaran, hóast fysioterapetiska tilboðið á sjúkrahúsinum ikki er endað, og heldur ikki væntast at enda fyribils. Tann arbeiðsgongdin gevur avbjóðingar við at skipa venjingartilboðið sum Almannaverkið bjóðar borgaranum. Avleiðingin fyri borgaran er m.a., at kontaktflatan hjá borgaranum gerst óneyðuga stór og samskipanin millum partarnar óneyðuga umfatandi.

Samanumtikið metir Almannaverkið, at Sjúkrahúsverkið eigur at samskipa og avstemma sítt venjingartilboð, áðrenn støða verður tikin til, um venjingartilboðið í Sjúkrahúsverkinum steðgar og venjingartørvurin eigur at verða fráboðaður og fluttur til Almannaverkið, áðrenn útskrivan, ella í seinasta lagi við útskrivan. Eisini metir Almannaverkið, at endurvenjingarætlanin eigur at verða send so mikið tíðliga, at til ber at skipa sparring og yvirlevering, tá tørvur er á tí, fyri at arbeiða víðari við somu dygd.

Borgarar, ið detta niður ímillum skipanir

Almannaverkið metir, at tað serliga eru tveir bólkar av borgarum, ið detta niður ímillum.

Tann eini bólkurin eru borgarar, sum hava fingið viðgerð í útlandinum, og sum verða útskrivaðir til egið heim, t.d av donskum sjúkrahúsi. Hesi kunnu t.d. vera fólk við amputatión ella bróst-skurðviðgerð, sum nátúrliga eiga eitt uppfylgjandi (post-operativt) venjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum. Ofta hava tey ikki eina uppfylgjandi avtalu/samrøðu í sambandi við, at tey koma heim aftur til Føroyar, og fáa ofta ikki nøktandi kunning í útlandinum, sum ger tey før fyri sjálvi at venda sær til avvarðandi sjúkrahús. Tey fáa heldur ikki eina innkalling til venjing, tí t.d. veit Ergo- og fysioterapideildin á Landssjúkrahúsinum, av góðum grundum ikki av, at tey hava tørv á venjing.

Almannaverkið metir, at tey síggja 1-3 av hesum borgarum um árið, og so hava tey hoyrt um nøkur, umvegis teirra arbeiðssambond. Ikki er gjørligt at vita, um hesi eru tey somu, tá nøvn vanliga ikki verða deild. Hetta gevur tó eina ábending um at tað kunnu vera fleiri, enn tey ið Almannaverkið veit um, ið hoyra til hendan bólkin.

Tey, sum Almannaverkið hevur tosað við, greiða vanliga frá, at danska sjúkrahúsið t.d. vísir til uppfylgjandi viðgerðir og venjing í bústaðarkommununi. Tá talan er um ein føroying, hava tey onga kommunu at vísa til. Tí fær borgarin ikki nøktandi kunning, sum ger hann føran fyri at koma til venjingartilboðini. Við ongari uppfylgjandi samrøðu við sjúkrahús ella ambulatorii, sum sendir borgarin til viðgerð í útlandinum, so er avvarðandi sjúkrahús kanska ikki nóg skjótt og væl kunnað um, at borgarin er útskrivaður og hevur ein tørv á post-operativari tænastu, sum t.d. venjing.

Hin bólkurin, ið Almannaverkið sær lítið til, eru borgarar, sum hava lættar og miðaltungar skaðar. Tey kunnu vísa seg eftir eina tíð, tá ið t.d. "fjald brek" eftir heilaskaða koma til sjóndar, eftir at tey eru komin heim. Tá er initiativið at søkja venjing annaðhvørt teirra egna, ella hjá avvarðandi teirra. Fatanin hjá Almannaverkinum er, at hesi hava eitt venjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum til ongin venjingartørvur verður mettur at verða eftir. Ein hugsað frágreiðing kann verða, at førleikaskerjingin ikki hevur víst seg í tí varda umhvørvinum á eini seingjadeild, ella at metingin hevur verið, at avbjóðingin fór at laga seg av sær sjálvum, og tí ikki kravdi víðari venjing.

Styrkin í venjingartilboðnum hjá Almannaverkinum er, at venjingin kann fyriganga í egnum heimi og nærumhvørvinum. Eisini kann neyv samskipan gerast við t.d. sosialráðgevar og stuðlar, um talan er um arbeiðsbúgving ella aðrar avbjóðingar við at fáa gerandislívið at virka eftir skaða. Ein samskipan sum ikki kemur til sín rætt, tá Sjúkrahúsverkið bjóðar venjing inni á sjúkrahúsinum, til mett verður at venjingartørvurin er av. Fjaldu skaðarnar koma oftast ikki til sjóndar í fullum líki, fyrr enn borgarin er heima, við tað at tað er kompleksiteturin í gerandislívinum, sum avdúkar avbjóðingarnar. Tí er tað fatanin hjá Almannaverkinum, at borgarin er best møttur, um hann eisini fær bjóða venjing uttan fyri stovns-umhvørvið, sum eitt sjúkrahús av góðum grundum er, meðan tað framvegis er útlit fyri førleikamenning eftir skaðan. Við at verða knýttur at einum venjingartilboði eftir útskrivan, styrkist møguleikin fyri at borgarin verður loftaður, og fær venjing, um so er at "fjaldir skaðar" vísa seg, eftir at lívið uttan fyri sjúkrahúsið er byrjað.

Tað er trupult hjá Almannaverkinum at siga, hvussu nógvir borgarar verða vandir inni á sjúkrahúsunum inntil venjingartørvurin er mettur at verða av. Í mun til generel hagtøl, um hvussu nógv prosent av fólkunum í einum landi, verða rakt av t.d. apoplexi árliga, so kann tað vekja undran, at fleiri borgarar ikki verða ávístir til venjing hjá Almannaverkinum, tá hesir vera útskrivaðir av sjúkrahúsið.

Flutningur

Almannaverkið hevur skyldu at veita landsfevnandi tænastu, og ofta vísir tað seg, at landafrøðin kann vera ein avbjóðing. Nógvar tænastur, herundir endur- og viðlíkahaldsvenjing, eru staðsettar í býum og størru bygdunum, og má borgarin sjálvur syrgja fyri flutningi til og frá tænastuni.

Landsstýrisfólkið í almannamálum fekk við løgtingslóg um almannatrygd og tænastur heimild til at skipa flutningstænastu til tænastur, sum Almannaverkið veitir borgarum, sum orsaka av breki ella sjúku ikki megna at koyra ella flyta seg sjálvir ella at brúka almenn ferðasambond.

Skipanin er ætlað soleiðis, at Almannaverkið kannar tørvin hjá persóni og visiterar til flutningstænastu í sambandi við, at borgarin fær tillutað aðra tænastu frá Almannaverkinum.

Flutningstænasta er ikki íverksett, hóast ætlanin sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur varð at skipanin skuldi setast í verk í 2022.

Almannaverkið vísir á, at tað er ein avbjóðing fyri endur- og viðlíkahalds-venjingina, at flutningstænastan ikki er sett í verk. Vantandi flutningstænasta avmarkar ta venjing, ið tey kunnu bjóða borgarum, ið ikki sjálvir megna at koma til og frá venjing, og tí ikki kunnu taka av tilboðnum um venjing. Eisini vísa tey á, at borgarar í kommunum sum eru við í Serflutningsskipan landsins eru betur stillaðir enn borgarar í øðrum pørtum av landinum.

7.3 Avbjóðingar sambært kommununum

Í arbeiðinum hevur arbeiðsbólkurin innsavnað tilfar frá kommununum. Niðanfyri hava kommunurnar vísst á ítøkiligar avbjóðingar.

Yvirskipað

Kommunurnar hava góðar royndir við teimum tilboðum, sum verða veitt lokalt. Tær uppliva somuleiðis, at borgararnir taka væl ímóti tilboðunum.

Kommunurnar meta yvirskipað, at tær megna at lofta og skipa viðkomandi tilboð til allar teir borgarar, sum eldraøkið hevur samband við. Avbjóðingar eru tó at hóma, og fyri kommunurnar er tað serliga hesi viðurskifti, sum vísast kann á:

Starvsfólkatrot

Avbjóðingar kunnu stundum vera við at fáa nóg mikið av skikkaðum starvsfólki til at standa fyri venjingunum. Tí kemur tað fyri, at tilboðini verða skerd í styttri tíðarskeið ella í samanhangandi tíðarskeið í summarfrítíðini.

Hetta má tó metast sum ein generel samfelagslig avbjóðing, sum í mestan mun er orsakað av starvsfólkatroti og fleiri geirar kappast um somu starvsfólk.

Samskipan millum geirar

Okkurt bendir á, at ávísir bólkar av borgarum møguliga ikki fáa eitt viðkomandi venjingartilboð. Helst snýr hetta seg serliga um teir borgarar, sum hava klárað seg sjálvar og/ella ikki frammanundan fáa tilboð frá eldraøkinum.

Sum dømi kunnu nevnast borgarar, sum búgva í egnum heimi og sum eftir sjúkrahúsviðgerð fáa tørv á venjing. Talan kann eisini vera um borgarar, sum áður hava fingið tilboð frá Almannaverkinum og sum vegna aldur missa tilboðið og eiga at koma í kommunalt tilboð.

Mett verður at hesin trupulleikin kann loysast við betri samskifti og samskipan millum ymsu geirarnar, soleiðis at eldraøkini verða gjørd varug við borgarar, ið hava ella fáa tørv á venjing. Tað eigur at vera ábyrgdin hjá tí geiranum, sum letur borgaran frá sær, at hjálpa borgaranum víðari til næsta viðkomandi tilboð.

Í mars 2015 skrivaðu Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar undir sonevnda fleirpartasamstarvsavtalu.[8] Endamálið við avtaluni var at betra um samlaðu gongdina hjá borgarunum við skipaðum samstarvi og við greiðum ásetingum viðvíkjandi innihaldi og mannagongdum. Harumframt varð lagt upp til, at partarnir sínámillum gjørdu tvípartaavtalur, har tað var hóskandi og neyðugt. Skipast skuldi eisini ein stýribólkur, sum í høvuðsheitum skuldi hava avtaluna um hendi og hittast á regluligum statusfundum. Í fyrstu atløgu varð avtalan tíðaravmarkað til ársenda 2015, tá ið hon eftir ætlan skuldi endurskoðast. Arbeiðið við at endurskoða avtaluna bar ikki á mál.

Mannagongd við útskrivan frá sjúkrahúsi

Summar kommunur vísa á eina avbjóðing við, at tað stundum kann vera ógvuliga stutt tíð frá tí at boðini koma frá Sjúkrahúsverkinum til kommununa og til útskrivan. Tað kemur fyri, at hesi boð koma sama dag, sum borgarin ætlandi skal útskrivast. Hetta skapar altíð ávísar avbjóðingar, men tað er serliga avbjóðandi í teimum førum, har borgarin hevur umfatandi tørv og har fyrireikandi arbeiðið við endurvenjingarætlan, møguligum hjálpartólum og líknandi ikki er gjørt.

Tað kemur eisini fyri, at kommunala endurvenjingartoymið metir at borgarin hevur tørv á aðrari viðgerð ella avklárandi kanningum, sum ikki er gjørt á Sjúkrahúsinum, t.d. pínuviðgerð ella røntgenkanning.

Slík mál skapa avbjóðingar í kommununum, um kommunan ikki fær nóg langt skotbrá at fáa viðurskiftini í rættlag, áðrenn borgarin verður útskrivaður til kommunala tilboðið.

Endurvenjingarætlanir

Endurvenjingarætlanirnar frá Sjúkrahúsverkinum verða vanliga latnar kommununum, tá ið hetta er viðkomandi, tó eru tað kommunur, sum uppliva avbjóðingar við at fáa endurvenjingarætlanirnar frá Sjúkrahúsverkinum. Fyri kommunurnar er tó ongin føst mannagongd í sambandi við útskrivan frá sjúkrahúsverki til kommunalt tilboð, og kommunurnar eru eisini ymiskar á máli um, hvørt endurvenijngarætlan fylgir við borgaranum.

[8] Avtala um fleirpartasamstarv millum Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið, kommunalu samstørvini og Tórshavnar Kommunu: ***Fleirpartaavtala***

Fleiri kommunur fáa sostatt endurvenjingarætlanir frá sjúkrahúsinum, tá ið tørvur er á tí, meðan fatanin aðrastaðni er, at hetta at kalla ikki kemur fyri. Tá ið endurvenjingarætlan frá Sjúkrahúsverkinum ikki fyriliggur, skapar tað avbjóðingar við at meta um venjingartørvin, tí kommunan í teimum førum vantar kunnleika til, hvat er gjørt undir innleggjan, og hvørji serlig atlit eiga at verða tikin í mun til ta viðgerð, sum Sjúkrahúsverkið hevur veitt borgaranum.

Sum heild meta kommunurnar, at endurvenjingarætlanirnar frá Sjúkrahúsverkinumeru eitt gott útgangstøði fyri at gera eina framhaldandi ætlan fyri borgaran. Summar kommunur viðmerkja í hesum sambandi, at endurvenjingarætlanir frá Sjúkrahúsverkinum á ongan hátt má metast sum burturspilt arbeiði hjá Sjúkrahúsverkinum, tí ætlanirnar í summum førum eru tað einasta skjalið, sum kommunan hevur um borgaran.

Fleiri dømi eru tó um at hetta útgangsstøðið kann styrkjast. Serliga eru afturvendandi trupulleikarnir í hesum sambandi, at hædd ikki verður tikin fyri støðuni hjá borgaranum í heiminum, so borgarin av givnum orsøkum ikki fær somu hjálp í egnum heimi og á einari seingjardeild.

Til dømis kann borgarin hava avbjóðingar við at ganga trappur og gera mat – viðurskifti, sum ikki á sama hátt vísa seg á sjúkrahúsi, sum hevur bæði lyftu og matartænastu. Verða neyðug atlit til heimligu viðurskiftini ikki tikin í nóg góðari tíð kann tað føra til, at borgarin gerst verri fyri og fær óneyðug afturstig í førleikastøði.

Støðan kann eisini vera beint hin øvugta – nevniliga at borgarin klárar seg nógv betri, tá ið viðkomandi kemur aftur í vanda umhvørvið. Í slíkum føri verða endurvenjingarætlanirnar sjálvsagt eisini tillagaðar, tí tørvurin í slíkum føri er minni enn væntað varð.

Ein avbjóðing kann eisini vera, at borgarin ikki hevur fingið ta útgreining á sjúkrahúsinum, sum eldraøkið metir vera viðkomandi fyri endurvenjingina, t.d. røntgenkanningar og aðrar skanningar. Eftir umstøðunum kann tað tí vera trupult hjá kommununum at seta saman eitt gott, viðkomandi og fakliga grundað tilboð til borgaran.

Mett verður ikki, at kommunurnar sum so hava tørv á at fáa sera nágreiniligar endurvenjingarætlanir. Tørvurin er heldur at fáa góðan kunnleika til borgaran og borgarans sjúkrasøgu. Tá ið hetta grundarlagið er nóg gott, hava kommunurnar neyðugu førleikarnar at seta saman eina viðkomandi endurvenjingarætlan við støði í einari heildarmeting av borgarans støðu og tørvi.

Mett verður tí, at avbjóðingarnar við endurvenjingarætlanunum kunnu loysast við tættari samskifti og samskipan millum geirarnar. Í hesum sambandi verður víst á, at verður COSMIC-skipanin í størri mun latin upp fyri kommununum, hevði oftari borið til at skipa fakliga grundaði endurvenjingartilboð í kommununum. Somuleiðis eigur altíð at havast í huga, at ætlanin fyri borgaran í størst møguligan mun má taka støði í tí gerandisdegi, sum venjingarnar skulu hjálpa borgaranum at megna frameftir.

Flutningur

Sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., hava kommunurnar heimild til at veita flutning til og frá tænastum veittar sambært lógini. Í summum kommunum verður koyritænasta veitt, meðan aðrar kommunur ikki hava íverksett nakra koyritænastu, somuleiðis sum tað er ymiskt hvussu tænastan verður skipað, herundir viðvíkjandi egingjaldi. Harumframt hava eitt vaksandi tal av kommunum eina almenna busstænastu. Her verður hugsað um tær 29 kommunurnar og ikki eldraøkini, og tí er hendan flutningstænastan vanliga avmarkað til kommunumarkið. Hóast hetta, so kunnu hesar busstænastur vera viðvirkandi til at lætta um møguligar avbjóðingar við flutningi.

Tilboðini um endurvenjing hjá kommununum eru skipaði í Tórshavnar kommunu og í sjey samstarvsøkjum. Hetta ber í sær, at kommunurnar fevna um eitt minni landafrøðiligt øki enn Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið vanliga veita sínar tænastur í. Harafturat eru størru tilboðini í kommununum – røktarheim og sambýli – vanliga staðsett við deildum á størru plássunum, og tað verður í stóran mun raðfest at hava tilboð á øllum deildum. Harvið gerst landafrøðiliga økið enn minni.

Omanfyrinevnda kann hava verið viðvirkandi til, at kommunurnar ikki merkja nakran munandi eftirspurning eftir flutningstænastum, sum eru markaðar endurvenjingartilboðum.

7.4 Avbjóðingar sambært Krabbameinsfelagnum, MEGD og Landsfelag Pensjónista

Arbeiðsbólkurin hevur havt fundir við og sent út spurnarskema til: MEGD, Landsfelag Pensjónista og Krabbameinsfelagið. Hetta fyri at lýsa, hvørjar avbjóðingar brúkarin sær innan endur- og viðlíkahaldsvenjingina í dag.

Krabbameinsfelagið, MEGD og Landsfelag Pensjónista greiða hvør í sínum lagi frá, at teirra limir hava sera ymiskar fatan av, hvussu endurvenjingin í Føroyum virkar.

Nøkur hava sera góðar royndir og kenna, at tað verður tikið sera væl hond um tey, har samskipanin frá sjúkrahúsi til ávikavist Almannaverkið ella eitt eldrasamstarv hevur virka sera væl og hava tey fingið eina nøktandi endurvenjing.

Krabbameinsfelagið greiðir frá, at fleiri av teirra limum ikki fáa eina endurvenjingarætlan, tá tey verða útskriva frá sjúkrahúsi. Tað er eisini ymiskt í mun til, hvønn sjúklingabólk talan er um. T.d. fáa sjúklingar við bróstkrabba vanliga tilboð um endurvenjing við útskrivan, meðan sjúklingar við prostatakrabba onki tilboð fáa um endurvenjing við útskrivan á sjúkrahúsi.

Mett verður ikki, at krabbameinssjúklingar fáa nøktandi kunning um víðari endurvenjingartilboð í kommunala geiranum og hjá Almannaverkinum, og tørvur er á betri samskipan millum geirarnar.

Krabbameinsfelagið greiðir frá, at tað sær út til at sjúklingar, ið verða sendir til Danmarkar til viðgerðar, ofta detta niður ímillum. Hetta tí tey ikki koma inn aftur á Landssjúkrahúsið, eftir at viðgerðin er liðug í Danmark.

Á sama hátt sum Krabbameinsfelagið vísir Landsfelag Pensjónista á, at tað kennist nakað tilvildarligt um sjúklingar fáa nóg góða kunning um víðari endurvenjing.

Víðari verður víst á, at tað tykist sum um, at tað eru pensjónistar, ið ikki frammanundan hava samband við eldrasamstørvini kring landið, ið detta niður ímillum skipanirnar.

Landsfelag Pensjónista metir, at tað er umráðandi, at øll sum hava tørv á víðari endurvenjing fáa ein samskipara, soleiðis at hesi ikki sjálvi skulu finna runt í skipanini.

Limafeløgini undir MEGD vísa í stóran mun á manglandi viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið.

CP-Føroyar vísir á, at teirra limir bert fáa venjing frá 0 til 18 ár. Viðlíkahaldsvenjing til limir teirra yvir 18 ár manglar. Somuleiðis er tørvur á bæði sálarligum, kognitivum og talu venjingum. Harumframt vísir CP-Føroyar á at tey meta, at tørvur er á at broyta kunngerðina soleiðis, at Almannaverkið skal fylgja endurvenjingarætlanini frá Sjúkrahúsverkinum. Eftir at CP- Føroyar vóru á fundi er deild fyri Samskiftismenning sett á stovn í Almannaverkinum, og veitir Almannaverkið nú samskiftismenning, harundir taluvenjing, til sama málbólk sum fær endur- og viðlíkahaldsvenjing.

Giktafelagið vísir á, at tørvur er á viðlíkahaldsvenjing til teirra limir, har verður serliga hugsa um heittvatnshyljar. Í dag hava nakrir giktasjúklingar møguleika fyri at fáa viðgerð í heita hylinum í Klaksvík Hetta kann tó verða sera tíðarkrevjandi fyri borgarar, ið ikki búgva í norðurøkinum. Giktafelagið vísir á, at tað eru fleiri hyljar runt umkring í landinum, ið (við ávísum tillagingum) kundu verðið nýttir til viðlíkahaldsvenjing. Harumframt vísir Giktafelagið á, at teirra limir hava tørv á fysiskari venjing, smidligheitsvenjing og styrkivenjing, umframt klimaviðgerð.

Heilafelagið vísir á at tørvur er á, at venjingin er meira samanhangandi og ynskiligt er, at borgarar ikki skulu kenna seg ótryggar, tá ið tey skulu skifta millum Sjúkrahúsverk, Almannaverk og kommunur. Heldur ikki eigur skiftið millum geirar at ávirka tilboðið, sum tann rakti fær. Heilafelagið metir, at Almannaverkið eigur at fylgja endurvenjingarætlanini frá Sjúkrahúsverkinum. Heilafelagið upplivir, at borgarar við seinheilaskaða bíða ov leingi eftir einum tilboði frá Almannaverkinum, eftir at teir eru liðugt endurvandir í Sjúkrahúsverkinum. Eftir at borgarar hava fingið tilboð frá Almannaverkinum, er tilboðið nøktandi í ein ávísan mun, tó er tilboðið skjótt avtakandi, har borgarin eftir eina tíð onki tilboð fær um endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing. Her verður serliga hugsa um taluvenjing, og metur arbeiðsbólkurin tí, at hetta verður broytt nú Almannaverkið hevur sett nýggja deild fyri Samskiftismenning á stovn í ár.

Hjartafelagið vísir á, at hjartarehabiliteringin riggar væl og teirra limir eru væl nøgdir. Tó manglar at ein sálarfrøðingur verður knýttur at rehabiliteringini. Hjartafelagið vísir eisini á, at endurvenjingini riggar minni væl á Suðuroyar sjúkrahúsi, uttan at kunna siga, hví so er.

Aftaná at Hjartafelagið var inni á fundi saman við MEGD, er ein sálarfrøðingur settur í Sjúkrahúsverkinum, sum m.a. eisini skal vera knýttur at hjarta-rehabiliteringini.

Yvirordnað kenna feløgini ikki til tey rættindir tey sambært kunngerð hava í sambandi við endurvenjing, t.v.s., at ein borgari hevur rætt til endurvenjingar-ætlan, ið verður gjørd saman við borgaranum, ella borgarin hevur rætt til samskipara, ið hevur til uppgávu at samskipa endurvenjingartilboðið. Harumframt vísa Krabbameinsfelagið, MEGD og Landsfelag Pensjónista á, at skifti millum geirar ofta er trupult, tað verið seg bæði frá Sjúkrahúsverkinum til Almannaverkið/eldraøkini og frá Almannaverkinum til eldraøkini.

ADHD-felagið vísti á, at teirra limir hava tørv á vegleiðing, eisini eftir at tey eru vorðin 18 ár. Víst verður á, at tørvur er á einum neuro sálarfrøðingi, terapi viðgerð og dat-viðgerara. Sambært ADHD-felagnum sær tað út til at tey ungu detta niður ímillum skipanirnar, tá tey fylla 18 ár og harvið flyta yvir í vasknamannapsykiatrina.

Sinnisbati greiddi frá, at teirra limir hava tørv á hjálp til at klára gerandisdagin. Tað merkir, at tey hava tørv á bæði sálarligari og praktiskari hjálp. Hetta kann m.a. gerast við venjing í sosialum sambondum, í sjálvsáliti og í hvussu ein praktiskt virkar í gerandisdegnum.

Av tí, at hetta arbeiðið er ein eftirmeting av tilmælinum um samskipaða endur-venjing frá 2016, hevur arbeiðsbólkurin ikki viðgjørt tørvin á endurmenningar-tilboðum generelt ella sálarfrøðiligum tilboðum í Føroyum. Arbeiðsbólkurin hevur lýst, hvørjar avbjóðingar eru við samskipan av endurvenjingini millum Sjúkrahúsverk, Almannaverk og kommunur. Hvør tørvur er á sálarfrøðiligum tilboðum, herundir endur- og viðlíkahaldsvenjingartilboðum, er eitt stórt og viðkomandi mál í føroyska samfelagnum í dag. Arbeiðsbólkurin metir, at hetta er eitt ov stórt mál at lýsa í hesum áliti. Hetta mál eigur at verða tikið upp og lýst í einum áliti fyri seg.

8. MØGULIGAR LOYSNIR Á VERANDI AVBJÓÐINGUM



8

- Nýggj lóggáva ella broytingar í lógarverkinum
- Íverksetan av verandi lóggávu v.m.
- Avbjóðingar við endurvenjingarætlam
- Avbjóðingar við samskipan
- Borgarar, ið detta niður ímillum skipanirnar
- Manglandi flutningstænasta
- Starvsfólkatrot

8.1. Nýggj lóggáva ella broytingar í lógarverkinum

Ein partur av arbeiðssetninginum í hesum arbeiði er at meta um, hvørt avbjóðingarnar innan endurvenjing í Føroyum, kunnu loysast við lóggávu. Sum nevnt omanfyri, samtykti Løgtingið í 2018 eitt uppskot til samtyktar, har heitt varð á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið eina endurmenningarlóg ella rehabiliteringslóg, sum skuldi tryggja rættindi og skyldur hjá borgarum til rehabilitering (løgtingsmál 79/2018).

Viðv. lógarteknikki

Í sambandi við omanfyristandandi uppskot til samtyktar, hevur verið umrøtt, um tað ber til at gera eina lóg um rehabilitering ella endurvenjing í Føroyum. Í løtuni er rætturin til endurvenjing staðfestur í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Endurvenjing og rehabilitering sum heild, er eitt økið, sum gongur uppá tvørs av heilsumálum, almannamálum og kommunum.

Sambært stýrisskipanarlógini og løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna, hava landsstýrisfólk ábyrgd av sínum málsøki. Tí er ikki møguligt hjá einum landsstýrisfólki at lóggeva inn á økið hjá einum øðrum landsstýrisfólki.

Av tí, at landsstýrisfólkið í heilsumálum og landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum, saman við kommununum, hava partvísa ábyrgd av málsøkinum endurvenjing og rehabilitering, verður ikki mett, at tað í løtuni er møguligt at gera eina løgtingslóg um endurvenjing og rehabilitering, sum gongur uppá tvørs av heilsumálum, almannamálum og kommunum.

Um avgjørt verður at áseta reglur í lóg um endurvenjing og rehabilitering, verður mælt til, at leggja ein lógarpakka fyri Løgtingið, har landsstýrisfólk, ið varða av endurvenjingarøkinum, í felag leggja fram lógaruppskot við broytingum í teirra lóggávu, soleiðis at økið kann verða betur samskipað.

Nýggj rehabiliteringslóg

Sum nevnt omanfyri í kapitli 2, hevur seinastu árini verið gjørt nógv arbeiði fyri at betra um rættin til endurvenjing í Føroyum. Í 2015 varð rætturin til endurvenjing ásettur í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið og táverandi forsorgarlóg. Við kunngerð um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið frá 2017 og kunngerð um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið frá 2021, er neyvari ásett í kunngerð, hvussu endurvenjingin innan sjúkrahúsverkið og almannaverkið skal skipast og samskipast. Í hesum kunngerðum er rætturin til endurvenjingarætlan og samskipan innan Sjúkrahúsverk og Almannaverk ásettur. Eingin kunngerð er tó um endurvenjing í kommunala geiranum.

Umframt hetta, er avtalan um samstarv um m.a. endurvenjing millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið endurskoðað í 2020 og faldarin um endurvenjing varð givin út av nýggjum í 2022. Ætlanin við faldaranum er at lýsa, hvørji venjingartilboð eru innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur, soleiðis at borgarar kring landið skulu fáa møguleika til at koma til rætta endurvenjingartilboð.

Tað vil siga, at nógv arbeiði er gjørt fyri at betra um regluverkið á økinum. Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvørt avbjóðingarnar innan endurvenjing í Føroyum kunnu loysast við lóggávu ella á annan hátt. Umboðini í arbeiðsbólkinum hava eisini umrøtt spurningin við Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og Kommunufelagið.

Hendan umrøðan hevur víst, at tað ikki er regluverkið, ið krevur tær stóru ábøturnar. Heldur er avbjóðingin, at starvsfólk ið arbeiða innan endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing ikki hava nóg góðan kunnleika til regluverkið, sum av somu orsøk ikki er íverksett á nøktandi hátt. Av hesi orsøk, virkar regluverkið ikki í praksis.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin ikki, at tað fer at loysa avbjóðingarnar á økinum at tilevna eina nýggja rehabiliteringslóg. Arbeiðsbólkurin mælir tí frá at nýta orku uppá at tilevna nýggja lóggávu á økinum. Heldur eigur orkan at nýtast til at seta í verk verandi regluverk í teimum trimum geirunum, og fáa samskipanina at virka í praksis.

Mælt verður frá, at tilevna og seta í gildi nýggja rehabiliteringslóg. Mett verður ikki, at hetta hevði loyst tær avbjóðingar, ið eru á endurvenjingarøkinum. Mælt verður í staðin til, at orkan verður nýtt til at íverkseta verandi regluverk í teimum trimum geirunum, og at fáa samskipanina at virka í praksis.

Broytingar í galdandi lógarverki

Spurningurin er tó, um tað eru viðurskifti í galdandi lóggávu, ið krevja ábøtur, ella um galdandi lógir og kunngerðir, saman við samstarvsavtaluni á økinum, eru nøktandi fyri at kunna skipa samstarv millum geirarnar á nøktandi hátt, soleiðis at borgarar ikki detta niður ímillum.

Sjúkrahúsverkið hevur ta fatan, at tað er ein avbjóðing, at Sjúkrahúsverkið ger eina endurvenjingarætlan og tá ið sjúklingurin skal hava endurvenjing víðari innan Almannaverkið ella kommunurnar, gera hesi nýggja meting og nýggja endurvenjingarætlan til sjúklingin. Almannaverkið og kommunurnar hava ikki somu fatan. Hvørt hendan avbjóðing kann loysast við at gera lógarbroytingar, er lýst niðanfyri í brotinum um avbjóðingar við endurvenjingarætlan. Hetta evnið verður tí ikki viðgjørt nærri her.

Viðvíkjandi kunngerð um endurvenjing í kommunala geiranum

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016, varð mælt til, at ábyrgdarbýtið millum heilsuverk, almannaverk og kommunur skuldi gerast greiðari í lóggávu. Arbeiðsbólkurin gjørdi uppskot til kunngerðir, ið skulu gera viðurskiftini greiðari í mun til endurvenjingina innan Sjúkrahúsverkið og endurvenjingina innan Almannaverkið. Arbeiðsbólkurin staðfesti samstundis, at heimild ikki var í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. til at áseta nærri reglur um endurvenjing, sum kommunurnar veita fólkapensjónistum.

Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. varð tó broytt í 2020, tá ið ásetingar um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing vóru settar inn í lógina. Í § 10 a verður ásett, at kommunur veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing og at endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin kann búgva heima sum longst og kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi. Í § 10 b verður ásett, at kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna ellisbrek ella sjúku hevur týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.

Í sambandi við, at lógin var broytt, var hendan heimild sett inn í § 10 a, stk. 2 í lógini: "Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um endurvenjing, herímillum treytir fyri at fáa endurvenjing og reglur um endurvenjingarætlan og samstarv við almannaverk og sjúkrahúsverk." Hóast hendan heimild er sett inn í lógina, er eingin kunngerð enn sett í gildi um endurvenjing í kommununum.

Endamálið við kunngerðunum var, at fáa eitt greiðari ábyrgdarbýtið millum geirarnar viðvíkjandi endurvenjing og at fáa ásetingar í kunngerð um endurvenjingarætlan og samskipan.

Í kunngerðini um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið, er sostatt ásett í § 4, stk. 3, at um lækni metir, at sjúklinginum tørvar endurvenjing frá Almannaverki ella kommunu eftir útskrivan, skal Sjúkrahúsverkið samstarva við hesar myndugleikar um framhaldandi endurvenjing. Harumframt er ásett í § 7, stk. 2, at Sjúkrahúsverkið, við útskrivan av sjúklingi og við samtykki frá sjúklinginum, skal lata endurvenjingarætlanina til avvarðandi kommunu, Almannaverkið ella annað sjúkrahús, um endurvenjingin skal halda áfram har. Líknandi ásetingar eru í kunngerð um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið, har tað í § 3, stk. 3 er ásett, at um mett verður, at persónur, ið fær endurvenjing frá sjúkrahúsi ella kommunu, tørvar endurvenjing frá Almannaverkinum, skal Almannaverkið samstarva við sjúkrahúsið ella kommununa. Sambært § 2, stk. 3 skal Almannaverkið eftir avtalu við persónin, lata avvarðandi kommunu ella sjúkrahúsi endurvenjingarætlanina, um endurvenjing skal halda áfram har.

Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið hava sostatt eina kunngerðar álagda skyldu at samstarva. Hetta er ásett fyri at geva sjúklinginum eitt betri endurvenjingartilboð og fyri at tryggja, at sjúklingurin ikki dettur ímillum tveir geirar. Hendan skylda at samstarva er ikki áløgd kommunum í kunngerð. Í serligu viðmerkingunum til § 10 a í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., verður tó víst á, at "dentur hevur tó verið lagdur á at samstarva við Almannaverkið og Heilsumálaráðið fyri at tryggja, at borgarar ikki detta niðurímillum skipanirnar, og fyri at tryggja, at borgarin fær eina samskipaða og skynsama endurvenjing tvørtur um stovnar, og sostatt gera tað greitt, hvørja endurvenjing ávikavist kommunur, Almannaverkið og heilsuverkið veita borgarum".

Harumframt hevur sjúklingurin rætt til eina endurvenjingarætlan og samskipan í Sjúkrahúsverkinum og í Almannaverkinum. Tað er ásett í § 5 í kunngerð um endurvenjing í sjúkrahúsverkinum, at sjúkrahúsverkið skal bjóða sjúklinginum eina endurvenjingarætlan og at ætlanin skal verða gjørd í samráð við sjúklingin. Í § 6 er ásett, hvat endurvenjingarætlanin skal fevna um. Í § 4 er ásett, at sjúklingurin skal fáa tilnevnt eitt heilsustarvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa endurvenjingartilboðið til sjúklingin sambært kunngerðini. Líknandi ásetingar eru í kunngerð um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið. Ásett er í § 2, at Almannaverkið í samstarvi við borgaran skal leggja eina endurvenjingarætlan og hvat hendan ætlan skal fevna um. Sambært § 3 tilnevnir Almannaverkið eitt starvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa endurvenjingartilboðið til persónin.

Ongar ásetingar eru um endurvenjingarætlan ella samskipan av endurvenjingartilboðnum í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., men heimild er at áseta reglur um hetta í kunngerð sambært § 10 a í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.. Leggjast kann tó til merkis, at hóast ongar ásetingar eru, sum áleggja kommununum at gera endurvenjingarætlanir, so verða tær í verki nýttar í øllum kommunum.

Umframt ásetingar í kunngerð, varð ein avtala um samstarv millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið sett í verk í 2020. Í avtaluni eru ásetingar um samstarv innan endurvenjing. Kommunurnar eru ikki partur av hesari avtalu.

Heilsumálaráðið metir, at tað er neyðugt, at ein kunngerð verður gjørd um endurvenjing í kommununum. Hetta fyri at tryggja eina skyldu til samstarv ímillum sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur og fyri at áseta reglur um endurvenjingarætlan í kommunalum regi. Ein kunngerð kann eisini tryggja, at ein minimum standardur verður settur í mun til, hvat endurvenjingartilboð borgarin hevur rætt til frá kommununum. Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið eru ivasom um, hvørt tað er neyðugt at áseta nærri reglur á økinum, enn tær reglur um endurvenjing, ið longu eru ásettar í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt. Víst verður á, at ein kunngerð ikki neyðturviliga er besta amboð at tryggja eitt gott samstarv millum geirar. Fundirnir við hoyringspartarnar hava heldur ikki bent á ein tørv á einari kunngerð, eins og staðfestast má, at endurvenjingarætlanir í verki verða nýttar í øllum kommununum.

Semja er í arbeiðsbólkinum um, at tørvur er á at betra um samstarvið millum geirarnar, serliga fyri teir bólkar, sum í dag kunnu detta niðurímillum. Arbeiðsbólkurin er tí eisini samdur um, at tað kann kannast nærri, hvørt tað er skilagott at seta eina kunngerð í verk á kommunala økinum og hvat ein kunngerð um endurvenjing innan kommunurnar kann fevna um, soleiðis at endurvenjingartænastan kann verða betri samskipað tvørturum geirarnar. Arbeiðsbólkurin er eisini samdur um, at tað hevði verið skilagott at kanna møguleikarnar nærri fyri at gera eina samstarvsavtalu viðvíkjandi endurvenjing ímillum Almannaverk, Sjúkrahúsverk og kommunur.

Sum umrøtt omanfyri, var ein fleirpartasamstarvsavtala um m.a. endurvenjing gjørd í 2015 millum Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar. Hendan avtala varð í fyrstu atløgu tíðaravmarkað til ársenda 2015, tá ið hon eftir ætlan skuldi endurskoðast. Arbeiðið við at endurskoða avtaluna bar ikki á mál. Sum umrøtt omanfyri, er ein samtarvsavtala um m.a. endurvenjing gjørd í 2020 millum Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað kunnu vera fyrimunir í at hava eina formliga avtalu millum partarnar – treytað av, at hendan verður íverksett í øllum geirum og at eitt regluligt samstarv er um avtaluna. Havast skal eisini í huga, at síðani 2015 eru broytingar gjørdar í ymsum viðkomandi fortreytum, m.a. regluverki og journalskipanum. Arbeiðsbólkurin sær tí vansar í at taka fleirpartasamstarvsavtaluna frá 2015 uppaftur, uttan samstundis at gera neyðugar dagføringar og tillagingar til dagsins reglur og viðurskifti.

Mælt verður til, at Almanna- og mentamálaráðið tekur málið um at tilevna eina kunngerð um endurvenjing í kommunala geiranum upp saman við Kommunufelagnum.

Mælt verður harumframt til, at farið verður undir at kanna, um tað, við støði í fleirpartasamstarvsavtaluni frá 2015, er gagnligt at tilevna eina nýggja samstarvsavtalu um endurvenjing millum Almannaverk, Sjúkrahúsverk og kommunur.

8.2. Íverksetan av verandi lóggávu v.m.

Sum víst á omanfyri í kapitli 3, er seinastu árini gjørt eitt stórt arbeiði við at betra um lógarkarmarnar innan endurvenjingarøkið. Arbeiðið er gjørt fyri at betra um tænasturnar til borgaran til endurvenjing og fyri at betra um samskipanina millum geirarnar, í mun til endurvenjing.

Manglandi vitan

Í arbeiðinum við hesum áliti hevur tað tó víst seg, at ein avbjóðing er, at starvsfólk, ið starvast á økinum ikki kenna nóg væl til galdandi reglur. Hetta hevur ta avleiðing, at ásetingarnar í lóg, kunngerð og samstarvsavtalu ikki virka nóg væl í praksis. Í síðsta enda kann hetta viðføra, at tænastan til borgaran ikki virkar eftir ætlan og borgarin tí ikki fær neyðuga endurvenjing. Hetta kann somuleiðis viðføra, at vit samfelagsliga ikki fáa fult gagn av teimum tilboðum, sum eru í ymsu geirunum og sum játtan er raðfest til.

Almannaverkið hevur eina fatan av, at flest allir leiðarar fyri venjingartænastur kring landið kenna samstarvsavtaluna, meðan aðrir samstarvspartar ikki kenna avtaluna ella innihaldið í avtaluni í nøktandi mun.

Harumframt greiða Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og Kommunufelagið frá, at avbjóðingar eru, tá ið ein sjúklingur, ið tørvar endurvenjing, fer frá einum geira í annan og at avbjóðingarnar í hesum sambandi kundu verið loystar við tættari samskifti og samskipan millum geirarnar.

Í arbeiðinum hevði arbeiðsbólkurin fund við MEGD, Krabbameinsfelagið og Landsfelag Pensjónista. Feløgini upplýstu, at tey ikki kenna til tey rættindi, tey hava til endurvenjing sambært lóg og kunngerð. Tey kenna sostatt lítið til, at ein borgari hevur rætt til endurvenjingarætlan, ið verður gjørd saman við borgaranum, ella at borgarin hevur rætt til samskipara, ið hevur til uppgávu at samskipa endurvenjingartilboðið.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at hetta, í løtuni, er tann størsta avbjóðingin í mun til at fáa tilboðið um endurvenjing at virka betri og at fáa samskipa endurvenjingina millum geirarnar. Um starvsfólkini, ið arbeiða við endurvenjing, ikki hava neyðugu vitanina um regluverkið á økinum og sjúklingurin ikki kennir síni rættindi, kann tænastan ikki virka nøktandi. Arbeiðsbólkurin sær eisini fyrimunir í einari støðugari og regluligari miðling av faldaranum um endurvenjing og teimum tilboðum, sum eru til taks hjá borgarunum.

Íverksetan av lóggávu v.m.

Fyri at fáa eina loysn á hesum avbjóðingum, metir arbeiðsbólkurin, at neyðugt er at byrja eina tilgongd við at íverkseta galdandi lóggávu á økinum, herundir gera eina miðvísa ætlan um íverksetanina.

Í fyrstu atløgu er tørvur á at undirvísa starvsfólkum, ið arbeiða við endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing á øllum stigum, um galdandi lógarverk, kunngerðir og samstarvsavtalu.

Hendan undirvísing kann fara fram í einstøku verkunum, við tað, at undirvíst verður í galdandi lóggávu, kunngerðum og samstarvsavtalu. Mett verður, at neyðugt er at undirvísa allastaðni, har starvsfólk starvast við endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing.

Tá ið talan er um undirvísing, er ikki nøktandi, at undirvíst verður eina ferð. Í slíkum tilgongdum er neyðugt javnan at undirvísa, t.d. einaferð um árið um lóggávuna á økinum. Starvsfólkini hava tørv á at viðlíkahalda ta vitan, tey hava fingið og fáa møguleika til, leypandi, at umrøða avbjóðingar í umsitingini av økinum. Eisini kunnu nýggj starvsfólk koma í starv, sum hava tørv á undirvísing í lógarverkinum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er neyðugt at leggja eina ætlan fyri, hvussu undirvísingin skal leggjast til rættis, á hvørjum deildum innan Sjúkrahúsverk, Almannaverk og kommunur neyðugt er at undirvísa, og hvussu ofta undirvísingin skal fara fram. Síðani er neyðugt at fara undir tilgongdina at undirvísa starvsfólkum í teimum trimum geirunum.

Arbeiðsbólkurin metir, at borgarar og starvsfólk á økinum eiga at kenna til og hava atgongd til eina fullfíggjaða og dagførda kunning um endurvenjingartilboðini í ymsu økjunum. Vert er eisini at umhugsa at umskipa faldaran um endurvenjing og venjing frá 2022 til eitt talgild arbeiðsskjal, sum verður dagført so hvørt, sum broytingar verða gjørdar. Um hetta skal gerast, má støða tó takast til, hvør hevur ábyrgd av at tryggja, at faldarin er rætt dagførdur, eins og at tryggja, at borgarar og fakfólk á ymsu økjunum,kenna til faldaran og fáa vitan um, hvar tey kunnu fáa atgongd til hann.

Mælt verður til, at farið verður undir eina skipaða tilgongd, har arbeitt verður við at íverkseta galdandi lóggávu, kunngerð og samstarvsavtalu innan endurvenjing og at ein ítøkilig ætlan verður gjørd fyri hesum arbeiðinum.

Í fyrstu atløgu verður mælt til, regluliga, at undirvísa starvsfólkum, ið arbeiða við endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing um galdandi lógarverk, kunngerðir og samstarvsavtalu. Hetta soleiðis, at øll starvsfólk, ið arbeiða við endurvenjing kenna lógarverkið.

Umframt undirvísing um lóggávu í einstøku geirunum, verður eisini mett, at neyðugt verður at undirvísa uppá tvørs av geirunum, so starvsfólkini í teimum ymsu verkunum fáa vitan um, galdandi lóggávu og praksis í øllum geirum og saman kunnu umrøða avbjóðingar og loysnir í samskipanini av hesum. Arbeiðsbólkurin sær eisini fyrimunir í at arbeiða við at økja um kunnleikan til mentan, fortreytir og arbeiðshættir í ymsu geirunum. Í hesum sambandi eigur at verða arbeitt við, at starvsfólk í øllum geirum fáa eina felags fatan av, at tey arbeiða øll við persónum, ið skulu endurvinna mistar førleikar. Neyðugt er at bróta niður mørkini millum geirarnar. Óansæð um starvsfólkini arbeiða í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum ella hjá kommununum, so er neyðugt, at tey samstarva um, at persónurin, fær eitt samanhangandi endurvenjingartilboð. Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvussu undirvísingin uppá tvørs av geirum kundi verið skipað. Nógvir ymiskir mátar eru at skipa eina slíka íverksetan uppá. Ein máti er at skipa temadagar, har starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum, ið starvast við endurvenjing luttaka. Á hesum temadøgum kundi ávísar avbjóðingar verið tiknar upp, har trupulleikarnir vórðu umrøddir og viðgjørdir uppá tvørs av geirunum, t.d. við bólkaarbeiði ella øðrum. Hesir temadagar kundu verið skipaðir sum heildagstiltak ella seinnapartstiltak.

Eisini kundi verið umhugsað, at havt temadagar, har leiðarar, sum starvast við endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum, kunnu savnast at umrøða ávísar avbjóðingar innan samskipan av endurvenjing millum geirarnar.

Tá ið talan er um temadagar, metir arbeiðsbólkurin eisini, at tað er neyðugt at hava afturvendandi tiltøk, t.d. at miða ímóti, at temadagar verða hildnir eina til tvær ferðir um árið, har ymiskar avbjóðingar verða tiknar upp til umrøðu á hvørjum temadegi.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er møguligt at leggja samskipanina av hesum temadøgum í eina fasta legu, t.d. við at geirarnir árliga, skiftast um at hava samskipandi ábyrgd.

Mælt verður til, javnan at skipa fyri undirvísingardøgum ella temadøgum uppá tvørs av geirunum, har avbjóðingarnar viðvíkjandi samskipan av endurvenjingini í ávíkavist Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum verða viðgjørdar og har arbeitt verður í felag við at finna loysnir á avbjóðingunum.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvussu arbeiðið kann setast í verk. Ein møguleiki er at seta ein verkætlanarleiðara til at taka sær av íverksetanini av galdandi lóggávu á endurvenjingarøkinum. Hetta kann verða ein dýr loysn, við tað, at verkætlanarleiðari v.m. skal lønast.

Ein einfaldari loysn er, at arbeiðsbólkurin, ið hevur skrivað hetta álit, tekur sær av at fáa glið á íverksetanina og síðani letur arbeiðið til leiðslurnar í geirunum at føra víðari. Í arbeiðnum kann arbeiðsbólkurin hava starvsfólk, ið arbeiða í ávíkavist Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommunum, herundir leiðarar, dygdarmennarar og onnur til at hjálpa sær at fyrireika íverksetanina og at undirvísa starvsfólkum. Temadagarnir kundu verið skipaðir á tann hátt, at tað uppá skift er ávíkavast Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar, ið standa fyri temadegnum.

Mælt verður til, at starvsfólk í Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum og hjá Kommunufelagnum, saman við leiðslunum í geirunum, skipa fyri at íverkseta galdandi lóggávu á endurvenjingarøkinum.

8.3. Avbjóðingar við endurvenjingarætlan

Sum omanfyri nevnt er rætturin til endurvenjingarætlan og viðlíkahaldsvenjingarætlan reguleraður í kunngerð á heilsuøkinum og almannaøkinum. Hetta er ikki regulerað í kunngerð á kommunala økinum.

Sjúkrahúsverkið bjóðar sjúklinginum eina endurvenjingarætlan, tá ið endurvenjing verður veitt á sjúkrahúsi. Sjúklingurin skal í seinasta lagi við útskrivan av sjúkrahúsi, ella tá ið ambulanta endurvenjingin er endað, fáa endurvenjingarætlanina. Innan Almannaverkið og kommunurnar verður endurvenjing veitt grundað á eina fakliga meting hjá ávikavist Almannaverkinum ella kommununi. Áðrenn endurvenjing verður veitt, skal Almannaverkið gera eina endurvenjingarætlan í samstarvi við sjúklingin. Kommunurnar gera somuleiðis endurvenjingarætlanir fyri borgarar, sum fáa endurvenjing í kommununi.

Vísandi til tær frágreiðingar, ið arbeiðsbólkurin hevur fingið frá Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum eru ikki tær stóru avbjóðingarnar við endurvenjingarætlan í hvørjum geira sær, men avbjóðingar eru, tá ið persónurin skal fara úr einum geira í annan.

Avbjóðingar millum Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur

Almannaverkið upplýsir, at endurvenjingarætlan javnan fylgir við borgarum, sum verða ávístir frá Sjúkrahúsverkinum, men ikki altíð. Samstarv verður aloftast fingið í lag, um Almannaverkinum tørvar nærri lýsing av borgaranum. Oftast er talan um endurvenjingarætlan, men viðhvørt er talan um avrit av journal (notat frá kanningum hjá ergoterapeuti og fysioterapeuti, kanningarúrslit frá røntgen ella frá aðrari kanning ella útskrivingarbrævi). Eisini vísir Almannaverkið á, at endurvenjingarætlanir til tíðir koma ov seint og tað tí ber illa til at skipa skiftið á nøktandi hátt.

Kommunufelagið upplýsir, at endurvenjingarætlanir frá Sjúkrahúsverkinum vanliga verða latnar kommununum, tá ið hetta er viðkomandi. Tað eru tó kommunur, sum regluliga uppliva, at endurvenjingarætlanir ikki verða latnar frá Sjúkrahúsverkinum; eisini í førum har tað sambært kommununum átti at verið gjørd ein endurvenjingarætlan. Fatanin hjá kommununum sum heild er, at endurvenjingarætlanir frá Sjúkrahúsverkinum vanliga eru eitt gott útgangsstøðið fyri at gera eina framhaldandi ætlan fyri borgaran. Fleiri dømi eru tó um, at útgangsstøðið kann styrkjast.

Afturvendandi trupulleikar í hesum sambandi eru serliga, at hædd ikki altíð verður tikin fyri støðuni hjá borgaranum í heiminum. Borgarin fær, av givnum orsøkum, ikki somu hjálp í egnum heimi, sum viðkomandi kann fáa á einari seingjardeild. Harumframt kann vera stórur munur á fysisku kringstøðunum – bæði innan- og uttandura – og hetta kann avdúka serligar avbjóðingar, tá ið borgarin kemur aftur í heimligar umstøður.

Kommunurnar meta sum heild ikki, at tær hava tørv á at fáa sera nágreiniligar endurvenjingarætlanir. Tørvurin er heldur at fáa góðan kunnleika til borgaran og borgarans sjúkrasøgu. Í hesum sambandi meta fleiri kommunur tað vera ein trupulleika, at atgongdin til upplýsingar í COSMIC er so avmarkað. Kommunurnar meta samstundis, at avbjóðingarnar við endurvenjingarætlanunum í stóran mun kunnu loysast við tættari samskifti, vitanardeiling og samskipan millum geirarnar. Somuleiðis kunnu avbjóðingarnar loysast við, at ætlanin fyri borgaran í størst møguligan mun tekur støðið í gerandisdegnum hjá borgaranum.

Sjúkrahúsverkið hevur víst á, at tað er ein avbjóðing, at Sjúkrahúsverkið ger eina endurvenjingarætlan og tá ið sjúklingurin skal hava endurvenjing víðari innan Almannaverkið, ger Almannaverkið nýggja meting og nýggja endurvenjingarætlan til sjúklingin. Sama er galdandi fyri kommunurnar.

Ávís áhugafeløg vísa eisini á, at tað er ein trupulleiki, at hinir geirarnir ikki fylgja endurvenjingarætlanini hjá Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið metir, at hetta í summum førum viðførir, at tann endurvenjing, sum sjúklingur hevur fingið á sjúkrahúsinum, dettur niðurfyri, tá ið sjúklingurin verður útskrivaður. Tí hevur Sjúkrahúsverkið ta fatan, at tað kann vera burturspilt arbeiði at gera eina endurvenjingarætlan.

Almannaverkið metir ikki at tað er ein avbjóðing, at Almannaverkið ger sína egnu endurvenjingarætlan, tá ið borgarin byrjar eitt venjingarskeið innan Almannaverkið. Hetta merkir tó ikki, at endurvenjingarætlanin frá Sjúkrahúsverkinum er óneyðug. Tvørturímóti metir Almannaverkið at tað er neyðugt, at endurvenjingarætlan fylgir við í sambandi við útskrivan av sjúkrahúsi, har venjing hevur verið partur av viðgerðini. Hetta fyri at tryggja, at tænastan til borgaran byggir víðari á ta vitan, sum Sjúkrahúsverkið hevur ognað sær um støðuna hjá borgaranum.

Kommunurnar meta sum heild, at endurvenjingarætlanirnar hjá Sjúkrahúsverkinum, eru eitt gott útgangsstøðið fyri at gera eina framhaldandi ætlan fyri borgaran. Kommunurnar viðmerkja. at endurvenjingarætlanirnar frá Sjúkrahúsverkinum á ongan hátt mugu metast sum burturspilt arbeiðið, tí ætlanirnar í summum førum eru einasta skjalið, sum kommunan hevur um borgaran.

Sjúkrahúsverkið er sostatt av teirri fatan, at endurvenjingarætlanirnar ikki í nóg stóran mun verða nýttar í í hinum geirunum, ímeðan Almannaverkið og kommunurnar eru av teirri fatan, at tað er neyðugt at fáa endurvenjingarætlan frá Sjúkrahúsverkinum, soleiðis at víðari endurvenjingin í Almannaverkinum byggir á vitanina í Sjúkrahúsverkinum. Báðir geirar eru áhugaðir í, at endurvenjingarætlanin virkar best møguligt til gagns fyri sjúklingin.

Umrøða í arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á at fáa eina felags fatan ímillum geirarnar av, hvussu skipanin við endurvenjingarætlan kann virka best møguligt, tá ið ein sjúklingur fer úr einum geira í annan. Til hetta er neyðugt at fara undir eina tilgongd, har umboð frá Sjúkrahúsverki, Almannaverki og kommunum arbeiða saman við at fáa eina felags fatan av, hvussu skipanin við endurvenjingarætlan kann styrkjast og samskipast á besta hátt, so at endamálið við endurvenjingarætlanini verður rokkið og sjúklingurin í størst møguligan mun endurvinnur mistar førleikar.

Sum upplýst omanfyri er skipanin í Danmark tann, at kommunustýrið, ið hevur ábyrgd av endurvenjingini eftir útskrivan av sjúkrahúsi, ikki hevur heimild til at víkja frá læknafakligu metingini av endurvenjingartørvinum hjá sjúklinginum. Um tað í endurvenjingarætlanini stendur, at sjúklingurin hevur tørv á almennari endurvenjing eftir útskrivan, skal kommunustýrið skjótast gjørligt meta um, hvørt sjúklingurin hevur tørv á grundleggjandi ella kompleksari endurvenjing.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, um líknandi skipan átti at verið sett í gildi í Føroyum.

Heilsumálaráðið metir, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri sjúklingin, um Almannaverk og kommunur høvdu skyldu til at fylgja endurvenjingarætlanini hjá Sjúkrahúsverkinum. Mett verður at hetta hevði tryggja, at sjúklingurin fekk framhaldandi endurvenjing í hinum geirunum, tá ið tað varð neyðugt, umframt at sjúklingurin fekk eitt samanhangandi endurvenjingartilboð frá innskrivan á sjúkrahúsi, til endurvenjingin varð liðug. Ein fyrimunur við hesum leisti hevði eisini verið, at sjúklingurin bert hevði eina endurvenjingarætlan at fyrihalda seg til.

Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið meta ikki at hesin leistur er rætta loysnin, við tað at tað kann hava óhepnar avleiðingar fyri geirarnar, um tað verður lógarásett, at endurvenjingarætlanin hjá Sjúkrahúsverkinum skal verða fylgd í hinum geirunum. Eisini verður mett, at tað ikki er skynsamt at íverkseta eina skipan ið er gjørd eftir donskum viðurskiftum í Føroyum, við tað at bygnaðurin í hesum skipanum í Danmark og Føroyum er ymiskur og at danskar kommunur hava aðrar uppgávur enn Almannaverkið og føroysku kommunurnar.

Arbeiðsbólkurin metir, at tær avbjóðingar ið eru viðvíkjandi endurvenjingarætlanunum millum geirarnar kunnu loysast við at íverkseta eina skipaða tilgongd, har Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur arbeiða saman um at fáa eina felags fatan av, hvussu endurvenjingarætlanin kann tæna persónunum best møguligt tvørturum geirarnar, so at hesin í størst møguligan mun kann endurvinna mistar førleikar. Hetta kann verða gjørt í sambandi við íverksetan av verandi lóggávu, sum mælt er til undir punkti 8.2. omanfyri.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at um hendan tilgongd ikki vísir seg at bera á mál, er neyðugt at umhugsa aðrar loysnir. Í hesum sambandi eigur at verða kannað, hvussu londini rundanum okkum hava skipað seg innan hetta økið við endurvenjingarætlan, og um vit í Føroyum kunnu betra um skipanina við endurvenjingarætlan við íblástri frá lóggávu og praksis í londunum rundan um okkum. Í hesum arbeiði eigur danska skipanin at kannast nærri, herundir, um føroyska lóggávan eigur at verða broytt, soleiðis at tann endurvenjingarætlan, ið verður gjørd í Sjúkrahúsverkinum, skal verða fylgd í Almannaverki og kommunum. Í slíkum arbeiði er tó týdningarmikið at hava í huga, at tað kann vera avbjóðandi at taka einstakar fyriskipanir burturúr og føra tær inn í føroysku skipanirnar.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at man í hesari tilgongdini eigur at taka støðu til, hvørjir upplýsingar í COSMIC kunnu og skulu vera tøkir hjá móttakandi geiranum, tá ið ein borgari er liðugt endurvandur í Sjúkrahúsverkinum.

Mælt verður til, at farið verður undir eina skipaða tilgongd, har Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur arbeiða saman um at fáa skipanina við endurvenjingarætlan at virka, tá ið ein sjúklingur, við tørvi á endurvenjing, fer úr einum geira yvir í annan.

Um hendan tilgongd ikki vísir seg at bera á mál, verður mælt til at umhugsa aðrar loysnir við íblástri frá, hvussu onnur lond hava skipað seg innan økið. Heilsumálaráðið metir, at tað, í hesum sambandi, er umráðandi at kanna, um lóggávan eigur at verða broytt, soleiðis at endurvenjingarætlanin, ið verður gjørd í Sjúkrahúsverkinum, skal verða fylgd í Almannaverki og kommunum.

8.4. Avbjóðingar við samskipan

Sum omanfyrinevnt er rætturin hjá einum persóni at fáa samskipað sítt endurvenjingartilboð reguleraður í kunngerð. Sambært § 4 í kunngerð nr. 17/2017 um endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið, skal Sjúkrahúsverkið tilnevna eitt heilsustarvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa endurvenjingartilboðið til sjúklingin. Skipað skal vera fyri inn- og útskrivingarsamrøðum o.a. á sjúkrahúsinum, har avvarðandi heilsustarvsfólk, sjúklingurin, hansara avvarðandi og um neyðugt onnur luttaka.

Um lækni metir, at sjúklinginum tørvar endurvenjing frá Almannaverki ella kommunu eftir útskrivan, skal sjúkrahúsverkið samstarva við hesar myndugleikar um framhaldandi endurvenjing. Hetta samstarv skal verða sett í verk skjótast gjørligt í endurvenjingartilgongdini. Í § 4 í kunngerð nr. 130/2021 um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið, skal Almannaverkið tilnevna eitt starvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa endurvenjingartilboðið til borgaran. Um mett verður, at borgari, ið fær endurvenjing frá Almannaverkinum tørvar endurvenjing frá sjúkrahúsi ella kommunu, skal Almannaverkið samstarva við sjúkrahúsi ella kommunu. Hetta samstarv skal setast í verk skjótast gjørligt í endurvenjingartilgongdini. Ásetingar eru ikki í kunngerð um samskipan hjá kommununum.

Samanumtikið metir Sjúkrahúsverkið, at skipanin riggar við at samskipa endurvenjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum. Sjúklingar, ið eru innlagdir í longri tíðarskeið fáa samskipara, ið samskipar teirra endurvenjingartilboð innan Sjúkrahúsverkið. Tá ið talan er um styttri innleggingar, er ikki altíð brúk fyri samskipan av endurvenjingini, og tá verður mett um, hvørjir sjúklingar koma at hava brúk fyri framhaldandi endurvenjing. Sjúkrahúsverkið metir eisini, at skipanin riggar væl við samskipan av framhaldandi endurvenjingartilboðum til tey, ið verða útskrivað við eini endurvenjingarætlan til framhaldandi endurvenjing í Almannaverki ella hjá kommunum.

Í Almannaverkinum er mannagongdin tann, at tá ið borgari fær endur- ella viðlíkahaldsvenjing verður ein kontaktterapeutur valdur, sum hevur evstu ábyrgd av at arbeitt verður eftir venjingarætlanini og at neyðugu dagføringarnar verða gjørdar. Eisini hevur kontaktterapeuturin evstu ábyrgd av samstarvi við aðrar partar.

Almannaverkið og kommunurnar upplýsa, at tey ikki, í nóg stóran mun, verða kunnað ella inndrigin, tá ið ein sjúklingur, ið verður útskrivaður av Sjúkrahúsverkinum, hevur tørv á framhaldandi endurvenjing. Sjúkrahúsverkið hevur upplýst, at tey javnan hava internar tvørfakligar fundir um samskipan av endurvenjing. Landssjúkrahúsið hevur upplýst, at tey ikki altíð, í nóg góðari tíð, vita, um sjúklingurin skal hava víðari endurvenjing á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Suðuroyar Sjúkrahúsi, Almannaverkinum ella hjá kommununum.

Arbeiðsbólkurin metir, at skipanin viðvíkjandi samskipan av endurvenjingini tørvar ábøtur og avbjóðingar innan samskipan av endurvenjingini millum geirarnar kunnu loysast við, at undirvíst verður í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommununum um ásetingarnar um samskipan í galdandi lóggávu, umframt at tað regluliga verður skipa fyri temadøgum uppá tvørs av geirunum.

Mælt verður til, at skipanin at tilnevna ein samskipara til hvørt endurvenjingartilboð, verður ment við regluligari undirvísing um ásetingar í lóg og kunngerð um samskipara og við regluligum temadøgum uppá tvørs av geirunum.

8.5. Borgarar, ið detta niður ímillum skipanirnar

Yvirskipað sær tað út til, at endur- og viðlíkahaldsvenjingin riggar væl í hvørjum geira sær, men sum lýst omanfyri eru ávísar avbjóðingar, tá borgarar skulu flyta frá einum geira yvir í ein annan geira. Tað sær út til at ymiskir bólkar av borgarum detta niður ímillum skipanirnar og tískil onki tilboð fáa um antin endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing

Almannaverkið og kommunurnar meta, at tað serliga eru tveir bólkar av borgarum, ið detta niður ímillum.

Borgarar, ið hava fingið viðgerð í útlandinum og eru útskrivaðir til egið heim

Tann eini bólkurin eru borgarar, sum hava fingið viðgerð í útlandinum, og sum verða útskrivaðir til egið heim, t.d av donskum sjúkrahúsi. Hesi kunnu t.d. vera fólk við amputatión ella bróst-skurðviðgerð, sum náturliga eiga eitt uppfylgjandi (post-operativt) venjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum. Ofta hava tey ikki eina uppfylgjandi avtalu/samrøðu í sambandi við, at tey koma heim aftur til Føroyar, og fáa ofta ikki nøktandi kunning í útlandinum, sum ger tey før fyri sjálvi at venda sær til avvarðandi sjúkrahús. Tey fáa heldur ikki eina innkalling til venjing, tí t.d. veit Ergo- og fysioterapideildin á Landssjúkrahúsinum, av góðum grundum ikki av, at tey hava tørv á venjing.

Almannaverkið metir, at tey síggja 1-3 av hesum borgarum um árið, og so hava tey hoyrt um nøkur, umvegis teirra arbeiðssambond. Ikki er gjørligt at vita, um hesi eru tey somu, tá nøvn vanliga ikki verða deild. Hetta gevur tó eina ábending um at tað kunnu vera fleiri, enn tey ið Almannaverkið veit um, ið hoyra til hendan bólkin.

Tey, sum Almannaverkið hevur tosað við, greiða vanliga frá, at danska sjúkrahúsið t.d. vísir til uppfylgjandi viðgerðir og venjing í bústaðarkommununi. Tá talan er um ein føroying, hava tey onga kommunu at vísa til. Tí fær borgarin ikki nøktandi kunning, sum ger hann føran fyri at koma til venjingartilboðini. Við ongari uppfylgjandi samrøðu við sjúkrahús ella ambulatorii, sum sendir borgarin til viðgerð í útlandinum, so er avvarðandi sjúkrahús kanska ikki nóg skjótt og væl kunnað um, at borgarin er útskrivaður og hevur ein tørv á post-operativari tænastu, sum t.d. venjing.

Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja, at allir borgarar, ið hava verið uttanlands til viðgerð, koma inn aftur á sjúkrahúsið til eina viðtalu. Hetta soleiðis, at terapeutarnir í Sjúkrahúsverkinum kunnu meta um, hvørt borgarin hevur tørv á endurvenjing frá antin Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum ella kommununum.

Borgarar við løttum og miðaltungum skaðum.

Hin bólkurin, ið Almannaverkið sær lítið til, eru borgarar, sum hava lættar og miðaltungar skaðar. Tey kunnu vísa seg eftir eina tíð, tá ið t.d. "fjald brek" eftir heilaskaða koma til sjóndar, eftir at tey eru komin heim. Tá er initiativið at søkja venjing annaðhvørt teirra egna, ella hjá avvarðandi teirra. Fatanin hjá Almannaverkinum er, at hesi hava eitt venjingartilboð í Sjúkrahúsverkinum til ongin venjingartørvur verður mettur at verða eftir. Ein hugsað frágreiðing kann vera, at førleikaskerjingin ikki hevur víst seg í tí varda umhvørvinum, sum eitt sjúkrahús av góðum grundum er, ella at metingin hevur verið, at avbjóðingin fór at laga seg av sær sjálvum, og tí ikki kravdi víðari venjing.

Styrkin í venjingartilboðnum hjá Almannaverkinum er, at venjingin kann fyriganga í egnum heimi og nærumhvørvinum. Eisini kann neyv samskipan gerast við t.d. sosialráðgevar og stuðlar, um talan er um arbeiðsbúgving ella aðrar avbjóðingar við at fáa gerandislívið at virka eftir skaða. Ein samskipan sum ikki kemur til sín rætt, tá Sjúkrahúsverkið bjóðar venjing inni á sjúkrahúsinum, til mett verður at venjingartørvurin er av. Fjaldu skaðarnar koma oftast ikki til sjóndar í fullum líki fyrr enn borgarin er heima í egnum umhvørvi. Tað er kompleksiteturin í gerandislívinum, sum avdúkar avbjóðingarnar. Tí er tað fatanin hjá Almannaverkinum, at borgarin er best møttur, um hann eisini fær bjóða venjing uttan fyri stovnsumhvørvið, sum eitt sjúkrahús av góðum grundum er, meðan tað framvegis er útlit fyri førleikamenning eftir skaðan. Við at verða knýttur at einum venjingartilboði eftir útskrivan, styrkist møguleikin fyri at borgarin verður loftaður, og fær venjing, um so er at "fjaldir skaðar" vísa seg, eftir at lívið uttan fyri sjúkrahúsið er byrjað.

Tað er trupult hjá Almannaverkinum at siga, hvussu nógvir borgarar verða vandir inni á sjúkrahúsunum, inntil venjingartørvurin er mettur at verða av. Í mun til almen hagtøl, um hvussu nógv prosent av fólkunum í einum landi, verða rakt av t.d. apoplexi árliga, so kann tað vekja undran, at fleiri borgarar ikki verða ávístir til venjing hjá Almannaverkinum, tá hesir vera útskrivaðir av sjúkrahúsi.

Kommunurnar kunnu taka undir við sjónarmiðunum hjá Almannaverkinum.

Sjúkrahúsverkið vísir á, at tey kenna til trupulleikan við at fjaldir skaðar vísa seg eftir, at borgarin er mettur liðugt endurvandur í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið væntar, at hesin trupulleiki í stóran mun, verður loystur við, at ein neurosálarfrøðingur er settur í starv innan endurvenjingina í Sjúkrahúsverkinum.

Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja at borgarar við løttum skaðum, ið verða mettir liðugt endurvandir, fáa upplýsing um teirra møguleikar at fáa endur- og viðlíkahaldsvenjing frá ávikavist Almannaverkinum og kommununum.

Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja, at Almannaverkið ella kommunurnar fáa kunning um, at borgari við miðaltungum skaða, er útskrivaður av sjúkrahúsi, eisini í teimum førum har Sjúkrahúsverkið metir, at borgarin er liðugt endurvandur.

Mælt verður til, at Almannaverkið og kommunurnar gera mannagongdir, ið tryggja, at kunning um endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum verður skrásett og ein meting verður gjørd viðvíkjandi tørvi á víðari endur- ella viðlíkahaldsvenjing.

Fólkapensjónistar, ið ikki fáa tilboð frá kommununi frammanundan.

Okkurt bendir á, at ávísir fólkapensjónistar møguliga ikki fáa eitt viðkomandi venjingartilboð.

Helst snýr hetta seg serliga um teir borgarar, sum hava klárað seg sjálvar og/ella ikki frammanundan fáa tilboð frá kommununini.

Sum dømi kunnu nevnast borgarar, sum búgva í egnum heimi og sum eftir sjúkrahúsviðgerð fáa tørv á venjing. Talan kann eisini vera um borgarar, sum áður hava fingið tilboð frá Almannaverkinum og sum vegna aldur missa hetta tilboð og eiga at koma í kommunalt tilboð.

Mett verður, at hesin trupulleikin kann loysast við betri samskifti og samskipan millum ymsu geirarnar, soleiðis at eldraøkini verða gjørd varug við borgarar, ið hava ella fáa tørv á venjing. Tað eigur at vera ábyrgdin hjá tí geiranum, sum letur borgaran frá sær, at hjálpa borgaranum víðari til næsta viðkomandi tilboð.

Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið betra um verandi mannagongdir, so at skiftið yvir til kommunurnar hjá fólkapensjónistum, ið hava tørv á framhaldandi endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing, verður tryggjað.

Mælt verður til, at borgarar eftir egnum ynski, kunnu halda fram í verandi venjingartilboði, um hetta er væl grundað, og geirarnir í teimum førunum nýta heimildirnar at keypa tilboð hvør frá øðrum.

8.6. Manglandi flutningstænasta

Sjúkrahúsverkið

Í tilmælinum frá 2016 var vístá, at tilboðini til endurvenjing hjá landinum, skulu verða landsfevnandi, og tilboðini til endurvenjing hjá kommunum skulu vera atkomulig hjá borgarum í økinum. Endurvenjingartilboðið er í ávísum førum treytað av staðbundnum viðurskiftum ella hvar í landinum borgarin býr.

Sum nevnt omanfyri er skipanin í dag tann, at ein sjúklingur kann fáa tilboð frá Sjúkrahúsverkinum um ambulanta endurvenjing, men sjúklingurin fær ikki flutning til og frá sjúkrahúsinum.

Hetta viðførir, at allir føroyingar reelt ikki fáa sama tilboð um endurvenjing. Til dømis skal ein borgari, ið býr í t.d. Vágunum, sjálvur syrgja fyri flutningi úr Vágum til t.d. Klaksvíkar, fyri at fáa endurvenjing, ímeðan ein sjúklingur, ið býr í Klaksvík, ikki hevur útreiðslur av flutningi til endurvenjing.

Hetta er ein avbjóðing, sum viðførir, at sjúklingar í ávísum støðum í landinum, ikki taka av tilboðnum um endurvenjing, av tí, at teir ikki hava nøktandi flutning til og frá endurvenjingartilboðnum.

Sambært kunngerð nr. 24 frá 21. mars 2002 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar innanoyggja, kann Sjúkrahúsverkið veita flutning til sjúklingar, ið hava rætt til fríar veitingar, sambært løgtingslóg um sjúkrahúsverkið. Harumframt hava sjúklingar rætt til at fáa endurgjald fyri ferðaútreiðslur yvir 800 kr. árliga.

Almannaverkið

Almannaverkið hevur skyldu at veita landsfevnandi tænastu, og ofta vísir tað seg, at landafrøðin kann vera ein avbjóðing. Nógvar tænastur, herundir endur- og viðlíkahaldsvenjing, eru staðsettar í býum og størru bygdunum, og má borgarin sjálvur syrgja fyri flutningi til og frá tænastuni.

Landsstýrisfólkið í almannamálum fekk við løgtingslóg um almannatrygd og tænastur heimild til at skipa flutningstænastu til tænastur, sum Almannaverkið veitir borgarum, sum orsaka av breki ella sjúku ikki megna at koyra ella flyta seg sjálvir ella at brúka almenn ferðasambond.

Skipanin er ætlað soleiðis, at Almannaverkið kannar tørvin hjá persóni og visiterar til flutningstænastu í sambandi við, at borgarin fær tillutað aðra tænastu frá Almannaverkinum.
Flutningstænasta er ikki íverksett, hóast ætlanin, sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur varð, at skipanin skuldi setast í verk í 2022.

Almannaverkið vísir á, at tað er ein avbjóðing fyri endur- og viðlíkahaldsvenjingina, at flutningstænastan ikki er sett í verk. Vantandi flutningstænasta avmarkar ta venjing, ið tey kunnu bjóða borgarum, ið ikki sjálvir megna at koma til og frá venjing, og tí ikki kunnu taka av tilboðnum um venjing. Eisini vísa tey á, at borgarar í kommunum, sum eru við í Serflutningsskipan landsins eru betur stillaðir, enn borgarar í øðrum pørtum av landinum.

Kommunurnar

Sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., hava kommunurnar heimild til at veita flutning til og frá tænastum, veittar sambært lógini. Í summum kommunum verður koyritænasta veitt, meðan aðrar kommunur ikki hava íverksett nakra koyritænastu, somuleiðis sum tað er ymiskt, hvussu tænastan verður skipað, herundir viðvíkjandi egingjaldi. Harumframt hava eitt vaksandi tal av kommunum eina almenna busstænastu. Her verður hugsað um tær 29 kommunurnar og ikki eldraøkini, og tí er hendan flutningstænastan vanliga avmarkað til kommunumarkið. Hóast hetta, so kunnu hesar busstænastur vera viðvirkandi til at lætta um møguligar avbjóðingar við flutningi.

Tilboðini um endurvenjing hjá kommununum eru skipaði í Tórshavnar kommunu og í sjey samstarvsøkjum. Hetta ber í sær, at kommunurnar fevna um eitt minni landafrøðiligt øki enn Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið vanliga veita sínar tænastur í. Harafturat eru størru tilboðini í kommununum – røktarheim og sambýli – vanliga staðsett við deildum á størru plássunum, og tað verður í stóran mun raðfest at hava tilboð á øllum deildum. Harvið gerst landafrøðiliga økið enn minni.

Omanfyrinevnda kann hava verið viðvirkandi til, at kommunurnar ikki merkja nakran munandi eftirspurning eftir flutningstænastum, sum eru markaðar endurvenjingartilboðum.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at manglandi flutningstænasta er ein avbjóðing í mun til endur- og viðlíkahaldsvenjing. Hetta tí at borgarar, ið ikki sjálvir eru førir fyri at koma til og frá endur- og viðlíkahaldsvenjing, ikki fáa neyðuga venjing og tí ikki endurvinna mistan førleika ella møguliga missa endurvunnan førleika, tí tey ikki fáa ávísta viðlíkahaldsvenjing.

Mælt verður til, at flutningstænasta verður sett í verk innan Sjúkrahúsverkið. Í tí sambandi verður mælt til at kunngerð nr. 24 frá 21. mars 2002 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar innanoyggja, verður endurskoðað og landsstýrisfólkið í hesum sambandi ásetir nærri reglur um flutningstænastu, undir hesum treytir fyri at fáa flutningstænastu, skipan av flutningstænastu og gjald fyri flutningstænastu.

Mælt verður til, at flutningstænastan, sum er heimilað í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, verður sett í verk, og landsstýrisfólkið í hesum sambandi ásetir nærri reglur um flutningstænastu, undir hesum treytir fyri at fáa flutningstænastu, skipan av og gjald fyri flutningstænastu og markamót til aðrar flutningsskipanir.

Mælt verður til, at allar kommunur kanna eftir um staðbundnu flutningsmøguleikarnir eru nøktandi og um neyðugt er seta í verk eina koyritænastu, soleiðis at allir fólkapensjónistar, ið ikki sjálvi megna at koma til endur- og viðlíkahaldsvenjing, fáa møguleika til tess.

8.7. Starvsfólkatrot

Avbjóðingar hjá kommunum kunnu stundum vera við at fáa nóg mikið av skikkaðum starvsfólki til at standa fyri venjingunum. Tí kemur tað fyri, at tilboðini verða skerd í styttri tíðarskeið ella í samanhangandi tíðarskeið í summarfrítíðini. Almannaverkið vísir á, at tey stundum hava avbjóðingar við at manna farloyvisstørvini, meðan tey megna at manna flest øll tey føstu størvini.

Hetta má tó metast sum ein generel samfelagslig avbjóðing, sum í mestan mun er orsakað av starvsfólkatroti og fleiri geirar kappast um somu starvsfólk.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at heimild er fyri at keypa tænastur frá hvørjum øðrum. Møguliga kundi tað verið ein loysn um geirarnir, sum kappast um somu starvsfólk, gjørdu meira av at keypa tænastur frá hvørjum øðrum. Á henda hátt kundi tænastan til borgaran verðið betur enn hon er í dag.

Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar í felag umrøða, um tað í størri mun ber til at gagnnýta knappa starvsfólkatilfeingið við at keypa tænastur frá hvørjum øðrum.

9. JÁTTAN TIL ENDURVENJING OG VIÐLÍKAHALDSVENJING

9

- Játtan til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing
- Játtan til endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið
- Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið
- Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing á kommunala økinum

9.1. Játtan til endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016, varð mælt til, at játtan mátti setast av á fíggjarlógini til raðfesting av endurvenjingini, soleiðis at neyðug endurvenjingartilboð kundu verða ment og sett í verk. Mett varð, at játtanin til endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið skuldi hækkað 8,5 mió. kr.

Í 2016 og 2017 vóru 3 mió. kr. settar av til endurvenjing á fíggjarlógini, vísandi til tilmælið um samskipaða endurvenjing. Í 2020, 2021 og 2022 vóru 5,7 mió. kr. settar av á fíggjarlógini til endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið hevur nýtt hendan pening til at seta tveir fysioterapeutar til krabbameinsøki, heittvatnshyl og ein ergoterapeut til krabbameinsøki á Landssjúkrahúsinum, ein fysioterapeutar til giktaøkið og ein psykomotoriskan terapeut til scleoroseøkið v.m. á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og tveir fysioterapeutar til parkinsonøkið, barnaøkið og hjartaøkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Harumframt eru ein audilogopedur, ein neurosálarfrøðingur, ein sálarfrøðingur og ein kliniskur sexologur settir í Sjúkrahúsverkinum til at veita endurvenjingar-tænastur. Umframt hetta var í 2020 og 2021 játtað tilsamans 1,8 mió. kr. til tilboð um endurvenjing innan seinheilaskaða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tilsamans eru 10,5 mió. kr. settar av í meirjáttan til endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum frá 2016 til 2022.

Enn væntar eitt sindur í viðvíkjandi fíggjarligum kørmum til endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum. Av tí, at starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum skulu nýta arbeiðsorku til at skriva endurvenjingarætlanir og at samskipa endurvenjingartilboðini til sjúklingarnar, er tað, sambært Sjúkrahúsverkinum, tørvur á at seta tvey til trý eyka størv inn til hetta økið komandi árini.

Somuleiðis er tørvur á nýggjum endurvenjingartilboðum í Sjúkrahúsverkinum.

Mælt verður til, at nøktandi játtan til samskipan og endurvenjingarætlanir verður sett av innan Sjúkrahúsverkið.

Mælt verður til, at hækka játtanina til endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum so líðandi, soleiðis at ambulantu endurvenjingartilboðini kunnu víðkast til aðrar málbólkar.

Mælt verður harumframt til, at endurvenjingin í Sjúkrahúsverkinum framhaldandi verður raðfest samsvarandi tørvinum á økinum.

9.2. Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið

Endurvenjing

Almannaverkið arbeiðir mið- og stigvíst við at skipa eina landsfevnandi endurvenjingartænastu.

Í løtuni eru tvey toymi, sum eru staðsett í Tórshavn og Runavík/Klaksvík. Í einstøkum føri verður endurvenjingin veitt í nærumhvørvinum og heiminum hjá borgarum. Avtalur vera eisini í ein ávísan mun gjørdar við kommunur og privatar veitarar, um nýtslu av hølum og tólum og/ella keyp av endurvenjingartænastum.

Síðani 2014 hevur endurvenjingin hjá Almannaverkinum verið í fullum virksemi til allar málbólkar og um alt landið. Í 2023 vóru umleið 8 mió. kr. avsettar á fíggjarlógini til endurvenjing.

Mælt verður til, at endurvenjingin í Almannaverkinum framhaldandi verður raðfest samsvarandi tørvinum á økinum.

Viðlíkahaldsvenjing

Almannaverkið veitir í løtuni viðlíkahaldsvenjing til borgarar, sum hava parkinson, sclerosu og seinheilaskaða. Ætlanin er at tænastan stig- og miðvíst verður útbygd.

Av fíggjarligu metingunum fyri løgtingslóg um almannatrygd og tænastur framgongur, at viðlíkahaldsvenjingin verður mett at kosta 12 mió. kr., tá ið hon er fult útbygd til allar málbólkar. Higartil eru 4 mió. kr. avsettar til endamálið.

Mælt verður til, at hækka játtanina til viðlíkahaldsvenjing í Almannaverkinum við 2 mió. kr. árliga komandi fýra árini, soleiðis at tænastan kann víðkast til allar málbólkar, sum tørva viðlíkahaldsvenjing.

Samskiftismenning

Í 2018 gjørdist taluvenjing ein partur av endurvenjingini, og frá 1. september 2021 hevur Almannaverkið havt heimild til at veita taluvenjing sum ein part av viðlíkahaldsvenjingini.

Ásannandi at tørvurin á samskiftismenning, harundir taluvenjing, er ovurstórur, og hevur stóran týdning fyri eina væleydnaða endur- og viðlíkahaldsvenjing, hevur Almannaverkið sett deild fyri Samskiftismenning á stovn í 2023, ið savnar alla endur- og viðlíkahaldsvenjing innan samskifti á einum stað.

Ætlanin er, at tænastan stig- og miðvíst verður útbygd, og Almannaverkið ger einari neyvari lýsing av tørvinum, tá ið tænastan hevur virkað í eina tíð.

Mælt verður til, at samskiftismenning verður raðfest, so øll ið hava tørv á samskiftismenning innan endur- og viðlíkahaldsvenjing, fáa hesa tænastu.

9.3. Játtan til endur- og viðlíkahaldsvenjing á kommunala økinum

Síðan kommunurnar yvirtóku eldrarøktina er játtanin til endurvenjing økt munandi. Í Tórshavnar kommunu er samlaða lønarjáttanin til rehabilitering, umlætting, aktivitetir og heilsustimbran nærum tvífaldað, úr 13,5 mió. kr. í 2016 og upp í 26,6 mió. kr. í 2022. Verður vøksturin í sáttmálalønunum á 13% í tíðarskeiðnum drigin frá, so er talan um ein realvøkstur í lønarjáttanini á 84%. Eisini á eldraøkinum uttanfyri Havnina er endurvenjing munandi uppraðfest. Í 2016 vóru samanlagt 14 ársverk í fysio- og ergoterapi á teimum 7 eldrasamstørvunum uttanfyri Havnina, og í 2022 varð játtanin økt til 22 ársverk. Hetta samsvarar við ein vøkstur á næstan 60%.

Mælt verður til, at kommunurnar framhaldandi raðfesta endurvenjing samsvarandi tørvinum á økinum.

10

- Nýggj lóggáva ella broytingar í lógarverkinum
- Íverksetan av verandi lóggávu v.m.
- Avbjóðingar við endurvenjingarætlan
- Avbjóðingar við samskipan
- Borgarar, ið detta niður ímillum skipanirnar
- Manglandi flutningstænasta
- Starvsfólkatrot
- Játtan til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing

Nýggj lóggáva ella broytingar í lógarverkinum

1 Mælt verður frá, at tilevna og seta í gildi nýggja rehabiliteringslóg. Mett verður ikki, at hetta hevði loyst tær avbjóðingar, ið eru á endurvenjingarøkinum. Mælt verður í staðin til, at orkan verður nýtt til at íverkseta verandi regluverk í teimum trimum geirunum, og fáa samskipanina at virka í praksis.

2 Mælt verður til, at Almanna- og mentamálaráðið tekur málið um at tilevna eina kunngerð um endurvenjing í kommunala geiranum upp saman við Kommunufelagnum.

3 Mælt verður harumframt til, at farið verður undir at kanna, um tað, við støði í fleirpartasamstarvsavtaluni frá 2015, er gagnligt at tilevna eina nýggja samstarvsavtalu um endurvenjing millum Almannaverk, Sjúkrahúsverk og kommunur.

Íverksetan av verandi lóggávu v.m.

4 Mælt verður til, at farið verður undir eina skipaða tilgongd, har arbeitt verður við at íverkseta galdandi lóggávu, kunngerð og samstarvsavtalu innan endurvenjing og at ein ítøkilig ætlan verður gjørd fyri hesum arbeiðinum.

5 Í fyrstu atløgu verður mælt til, regluliga at undirvísa starvsfólkum, ið arbeiða við endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing um galdandi lógarverk, kunngerðir og samstarvsavtalu. Hetta soleiðis, at øll starvsfólk, ið arbeiða við endurvenjing kenna lógarverkið.

6 Mælt verður til javnan at skipa fyri undirvísingardøgum ella temadøgum uppá tvørs av geirunum, har avbjóðingarnar viðvíkjandi samskipan av endurvenjingini í ávíkavist Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunum verða viðgjørdar og har arbeitt verður við, í felag, at finna loysnir á avbjóðingunum.

7 Mælt verður til, at starvsfólk í Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum og hjá Kommunufelagnum, saman við leiðslunum í geirunum, skipa fyri at íverkseta galdandi lóggávu á endurvenjingarøkinum.

Avbjóðingar við endurvenjingarætlan

8 Mælt verður til, at farið verður undir eina skipaða tilgongd, har Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunur arbeiða saman um at fáa skipanina við endurvenjingarætlan at virka, tá ið ein sjúklingur, við tørvi á endurvenjing, fer úr einum geira yvir í annan.

9 Um hendan tilgongd ikki vísir seg at bera á mál, verður mælt til at umhugsa aðrar loysnir við íblástri frá, hvussu onnur lond hava skipað seg innan økið. Heilsumálaráðið metir, at tað, í hesum sambandi, er umráðandi at kanna, um lóggávan eigur at verða broytt, soleiðis at endurvenjingarætlanin, ið verður gjørd í Sjúkrahúsverkinum, skal verða fylgd í Almannaverki og kommunum.

Avbjóðingar við samskipan

10 Mælt verður til, at skipanin at tilnevna ein samskipara til hvørt endurvenjingartilboð, verður ment við regluligari undirvísing um ásetingar í lóg og kunngerð um samskipara og við regluligum temadøgum uppá tvørs av geirunum.

Borgarar, ið detta niður ímillum skipanirnar

11 Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja, at allir borgarar, ið hava verið uttanlands til viðgerð, koma inn aftur á sjúkrahúsið til eina viðtalu. Hetta soleiðis, at terapeutarnir í Sjúkrahúsverkinum kunnu meta um, hvørt borgarin hevur tørv á endurvenjing frá antin Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum ella kommununum.

12 Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja, at borgarar við løttum skaðum, ið verða mettir liðugt endurvandir, fáa upplýsing um teirra møguleikar at fáa endur- og viðlíkahaldsvenjing frá ávikavist Almannaverkinum og kommununum.

13 Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið ger mannagongdir, ið tryggja, at Almannaverkið ella kommunurnar fáa kunning um, at borgari við miðaltungum skaða, er útskrivaður av sjúkrahúsið, eisini í teimum førum har Sjúkrahúsverkið metir, at borgarin er liðugt endurvandur.

14 Mælt verður til, at Almannaverkið og kommunurnar gera mannagongdir, ið tryggja, at kunning um endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum verður skrásett og ein meting verður gjørd viðvíkjandi tørvi á víðari endur- ella viðlíkahaldsvenjing.

15 Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið betra um verandi mannagongdir, so at skifti yvir til kommunurnar hjá fólkapensjónistum, ið hava tørv á framhaldandi endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing, verður tryggjað.

16 Mælt verður til, at borgarar eftir egnum ynski, kunnu halda fram í verandi venjingartilboðið um hetta er væl grundað og geirarnir í teimum førum nýta heimildirnar at keypa tænastur frá hvørjum øðrum.

Manglandi flutningstænasta

17 Mælt verður til, at flutningstænasta verður sett í verk innan Sjúkrahúsverkið. Í tí sambandi verður mælt til, at kunngerð nr. 24 frá 21. mars 2002 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar innanoyggja, verður endurskoðað og at landsstýrisfólkið í hesum sambandi ásetir nærri reglur um flutningstænastu, undir hesum treytir fyri at fáa flutningstænastu, skipan av flutningstænastu, gjald fyri flutningstænastu.

18 Mælt verður til, at flutningstænastan, sum er heimilað í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, verður sett í verk, og landsstýrisfólkið í hesum sambandi ásetir nærri reglur um flutningstænastu, undir hesum treytir fyri at fáa flutningstænastu, skipan av og gjald fyri flutningstænastu og markamót til aðrar flutningsskipanir.

19 Mælt verður til, at allar kommunur kanna eftir um staðbundnu flutningsmøguleikarnir eru nøktandi og um neyðugt er seta í verk eina koyritænastu, soleiðis at allir fólkapensjónistar, ið ikki sjálvi megna at koma til endur- og viðlíkahaldsvenjing, fáa møguleika til tess.

Starvsfólkatrot

20 Mælt verður til, at Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og kommunurnar í felag umrøða, um tað ber til í størri mun at gagnnýta knappa starvsfólkatilfeingið við at keypa tænastur frá hvørjum øðrum.

Játtan til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing

21	Mælt verður til, at nøktandi játtan til samskipan og endurvenjingarætlanir verður sett av innan Sjúkrahúsverkið.
22	Mælt verður til, at hækka játtanina til endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum so líðandi, soleiðis at ambulantu endurvenjingartilboðini kunnu víðkast til aðrar málbólkar.
23	Mælt verður til, at endurvenjingin í Sjúkrahúsverkinum framhaldandi verður raðfest samsvarandi tørvinum á økinum.
24	Mælt verður til, at endurvenjingin í Almannaverkinum framhaldandi verður raðfest samsvarandi tørvinum á økinum.
25	Mælt verður til, at hækka játtanina til viðlíkahaldsvenjing í Almannaverkinum við 2 mió. kr. árliga komandi fýra árini, soleiðis at tænastan kann víðkast til allar málbólkar, sum tørva viðlíkahaldsvenjing.
26	Mælt verður til, at samskiftismenning verður raðfest, so øll ið hava tørv á samskiftismenning innan endur- og viðlíkahaldsvenjing, fáa hesa tænastu.
27	Mælt verður til, at kommunurnar framhaldandi raðfesta endurvenjing samsvarandi tørvinum á økinum.

Brot úr samstarvsavtalu millum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið frá 2020:

Endamálið við hesi avtaluni er at betra um samlaðu sjúklinga-/borgaragongdina við einum skipaðum tvørgeirasamstarvi millum Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið við greiðum ásetingum viðvíkjandi innihaldi og mannagongdum.

Endurvenjing (fysioterapi, ergoterapi vm.)

Endamál:
- At borgari, ið hevur læknafakligan tørv á framhaldandi endurvenjing frá Almannaverkinum, fær samanhang í tænastuna.
- At uppgavubýtið millum fakbólkarnar og tænastuveitararnar er greinað.
- At fyribyrgja at somu kanningar verða gjørdar fleiri ferðir.

Málbólkur:
Borgari, sum eftir endurvenjing á Sjúkrahúsi framhaldandi hevur læknafakligan tørv á endurvenjing frá Almannaverkinum.

Tænastur frá Almannaverkinum
- Endurvenjing til borgarar í aldrinum 18-66 ár, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistan førleika. Hetta fyri at fáa, ella fasthalda, tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.
- Endurvenjing til borgarar í aldrinum 18-66 ár, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistan førleika. Hetta fyri at klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Gongd frá ergo/fysioterapi venjing til innlagdar sjúklingar/ambulantar sjúklingar til útskrivan til Almannaverkið

- Umsókn um endurvenjing verður send Almannaverkinum, og brúkari skal skriva undir.
- Tá ið endurvenjing ella ambulant viðgerð á sjúkrahúsi er um at vera liðug, ger terapeutur á sjúkrahúsi endurvenjingarætlan *) saman vid borgara.
- Terapeutar á sjúkrahúsi samstarva eftir tørvi við avvarðandi fakbólkar, avtala uppgávubýtið og senda status til avvarðandi stavn.

*) Endurvenjingarætlan skal innihalda:

- Sjúkrasøgu
- Læknaviðgerð
- Terapeutiskar interventiónir
- Status
- Tørvslýsing

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Kommunufelagið

sniða.fo